# Miðnámsrit

20 oktober 2020

## Um blaðið

Karakterstigar eru lutfalsliga nýggir í søguligum samanhangi. Teir komu fram um 1800 sum avleiðing av ídnaðarkollveltingini og eini vaksandi bureaukratisering í útbúgvingum. Men tað var ikki við læring fyri eyga, at karakterstigar vórðu uppfunnir. Í aðrari grein spyrja vit, hví miðnámsskúlar hava sokallaðar karakterfundir, sum tíðin er farin frá.

Vísindaástøði er partur í lærugreinini lestrarmenning á miðnámi. Endamálið er at fyrireika næmingarnar til víðari útbúgving. Spurningurin er, hvussu umfatandi vísindaástøði á miðnámi skal vera.

Átakið *Føroyar lesa* skal stimbra lesihugin hjá teimum ungu, sum lesa lítið. Átakið stendur í andsøgn við námsætlanir í máli, sum siga, at næmingar skulu lesa minni, enn fyrr varð kravt, og eftirspurningur eftir føroyskum bókum er nógv minkaður. Sum ongantíð fyrr eru bókasøvn á miðnámi neyðug í talgilda meldrinum.

Skúlanet verður nýggjur KT-felagsskapur, ið fer at hava alt KT-økið í føroyskum skúlum um hendur. Við hesum er vandi fyri, at tað, sum einstakir skúlar hava bygt upp innan KT, verður brotið niður. Og eisini verður hetta dýrt fyri samfelagið.

Blaðstjórn: Olav Absalonsen og Tórður Johannesarson

# Innihaldsyvirlit

Hví hava vit karakterstigar? Olav Absalonsen........3

Karakterfundir eru frá eini farnari tíð, Tórður Johannesarson........11

Vísindaástøði fyri 1s – ein áhugaverd innleiðsla til miðnám? Christian Ihlen........14

Næmingar lesa minni enn nakrantíð, Tórður Johannesarson........27

Bókasavnið á Glasi, Tórður Johannesarson........30

Skúlanet – ein KT-loysn? Tórður Johannesarson........33

FabLab á Kambsdali, Jóannes Djurhuus........36

Persónupplýsingar og dátuvernd – ein innleiðsla til dátuverndarrættin, John N. Olsen...39

# Hví hava vit karakterstigar?

Olav Absalonsen

**Karakterir og karakterstigar eru nýggj fyribrigdi, søguliga sæð. Um aldarskiftið millum 18. og 19. øld verða karakterstigar uppfunnir. Hetta er forvitnisligt. Hví mundu karakterstigar koma fram júst um tað mundið? Og hvussu hava teir roynst?**

## Søguligt afturlit

Í einari dagbók frá 1785 skrivar rektarin á Yale, at 58 studentar møttu upp til próvtøku; 20 fingu Optimi, 16 fingu Second Optimi, 12 Inferiores, og 10 fingu Pejores. Hetta er kanska fyrstu ferð, at karakterir eru givnir á hægri skúla í USA. Tey latínsku orðini bera brá av samanbering: teir bestu, teir næstbestu, teir verru og teir ringastu.

Í 1788 kom fyrsti karakterstigin í Danmark, sum var í 5 stigum: Laudabilis præ ceteris (nógv rós vert); Laudabilis (rós vert); Haud illaudabilis (ikki ikki rós vert); Non Contemnendus (ikki rós vert); 0

Í Onglandi fann William Farish, ið var lærari í Cambridge, upp á at geva karakterir í 1792. At læra næmingarnar at kenna tók ov nógva tíð frá honum. Tað kravdi, at hann setti seg inn í, hvat teir skiltu, og hvussu teir lærdu. Og tað setti mark fyri, hvussu nógvar næmingar hann kundi fylgja, og eisini mark fyri, hvussu nógvar pengar hann kundi forvinna sum lærari. Karakterirnir gjørdu, at lønin hjá honum bleiv størri, og arbeiðið minni. Nú var ikki longur neyðugt hjá honum at geva sær far um, hvat næmingarnir hugsaðu, og hvat teir skiltu. Karakterskipanin gjørdi tað fyri hann.

Thom Hartmann heldur, at tað var ikki av tilvild, at karakterir komu fram um júst hetta mundið. Karakterlíkar skipanir vóru longu gjørdar fyri arbeiðsmenn í verksmiðjum fyri at vita, um vørurnar, teir gjørdu, høvdu tann standard, ið kravdist. Í kjalarvørrinum av ídnaðarkollveltiningini kom karakterkollveltingin í skúlunum.

Í 19. øld kom ferð á at gera karakterstigar. Í fyrru helvt av øldini vóru karakterirnir lýsingar ella lýsingarorð. Til dømis kom sokallaði Ug-stigin í Danmark í 1805, og hevði hann 6 stig. Í 1830'unum varð so smátt farið at seta tøl á karakterirnar, og í 1845 vórðu tøl sett á Ug-stigan, sum síðani hevur verið nevndur Ørsted-stigin. Munurin ímillum karakterirnar er progressivur: 1, 2, 4, 8, 16. Um Ug er 100%, Mg 80%, G 60%, Tg 40%, Mdl 20%, og Slet er 0, hevði tann støddfrøðiliga funktiónin sæð soleiðis út:

$$F(x) = -\left(2^{(5-5x)}\right) + 9$$

har *F(x)* er talið fyri karakterin, og *x* er avrikið í prosentum. Tað merkir, at um tú skuldi halda eitt miðal á til dømis 7, skuldi tú hava tvey Ug fyri viga upp ímóti einum G.

Talva 1. Ørsted-stigin

| Met | Lýsing | Talmet |
|---|---|---|
| Ug | Udmærket godt | 8 |
| Mg | Meget godt | 7 |
| G | Godt | 5 |
| Tg | Tæmmelig godt | 1 |
| Mdl | Mådeligt | -7 |
| Slet | Slet | -23 |

Tølini blivu brúkt at rokna miðaltøl, og hugsanin við mununum man hava verið at dumpa tey, sum høvdu eitt Slet ella ov nógv Mdl, hóast tey kundu hava nógvar góðar karakterir. Seinni í øldini vórðu tveir millumkarakterir lagdir ímillum tey 5 gloppini, soleiðis at stigin fekk 16 stig. Í 1943 blivu tveir teir niðastu millumkarakterir tiknir av, soleiðis at stigin hevði 14 stig, og 7 varð lagd afturat øllum karakterum, soleiðis at Ug varð 15, Mg varð 14, og so víðari. Men kravið at standa var eisini 7 hægri, so henda forskjóting hevði sum so ongan týdning. Nógvir føroyingar minnast henda stigan, sum bleiv brúktur her til mitt í 1960'unum.

Aðrastaðni í verðini vóru nógvir ymiskir karakterstigar royndir í 19. øld. Síðst í øldini varð ABCDEF-stigin uppfunnin. Mark Durm, ið hevur kannað karakterstigar í søguni, kemur til ta niðurstøðu, at henda søgan er merkt av, at skúlar ella myndugleikar royna seg fram í blindum við *trial and error*, og spyr, um tað er skilagott (sum eyðvitað er ein leiðandi spurningur).

## 13-stigin

Í 1963 kom 13-stigin, og varð settur í verk árini aftaná, fyrst í realskúlanum og á miðnámi og seinni á hægri námi. Hann var linjubeinur, og tískil øðrvísi enn Ørsted-stigin. Hugsanin er, at 8 er ein ein karakterur í miðjuni, soleiðis at 5 og 11 eru líka langt frá hesi miðju. Í real, student og HH kravdist eitt miðaltal fyri at standa, men eitt eyka krav var tann so-nevnda 13-reglan: Samløgan av tveimum teimum lægstu metunum + miðaltalið av restini skuldi vera minst 13. Í hesari reglu sæst hugsanin frá Ørsted-stiganum aftur, at hevur næmingur ov nógvar lágar karakterir, kunnu nógvir góðir ikki viga upp ímóti. Seinni bleiv 13-reglan tikin av, og kravið fyri at standa á miðnámi varð hækkað úr 5,5 upp í 6,0.

## 7-trinstigin

Ráðstevna var í Norðurlandahúsinum 25. august 2008. Mentamálaráðið skipaði fyri, og nógvir lærarar vóru og lurtaðu. Ráðstevnan hevði til endamáls at greiða okkum frá, hví vit í Føroyum skuldu hava tann nýggja 7-trinstigan, sum varð settur í verk í Danmark nøkur ár frammanundan. Har vóru fleiri fyrilestrar, og áhoyrarar kundu seta spurningar.

Ein førdi fram, at lýsingarnar av karakterum í 13-stiganum vóru óhepnar, og nevndi 10 sum dømi: *10 gives for den udmærkede, men noget rutineprægede præstation* (av handahógvi merkt avrik). Eg lendi í Vágum í gjár, segði hann, og var fegin um, at flogskiparin hevði eina av handahógvi merkta lending, og ikki fann upp á nakað sjálvstøðugt – ella ørt. Eftir 13-stiganum hevði flogskiparin fingið 10, tí fyri at fáa 11 skal avrikið eisini vera sjálvstøðugt.

Henda søgan bleiv so brúkt sum ein av mongum grundgevingum fyri, at 13-stigin ikki longur var tíðarhóskandi. Søgan hevur síðani ofta elvt til kjak á lærarastovum og aðrastaðni. Er hetta so einfalt, sum fyrilesarin vil vera við? Summi føra fram, at næmingar á miðnámi eru ikki flogskiparar, og vit mugu eisini geva høg met fyri tað originala og geniala. Lýsingar av karakterunum í 7-trinstiganum bera brá av, at tað ræður um ikki at gera feilir – í tráð við søguna um lendingina í Vágum.

Á somu ráðstevnu greiddi ein annar frá, at 7-trinstigin var neyðugur, tí hann samsvaraði við ECTS-stigan: A, B, C, D, E, Fx, F. Hann fór at gera tað lættari hjá donskum og føroyskum næmingum at søkja á hægri lærustovnar í øðrum londum, sum ikki skiltu 13-stigan. Ein áhoyrari spurdi, hví 7-trinstigin so var í tølum og ikki bara bókstavum. Svarið var: *Det er fordi vi vil kunne regne et gennemsnit*. Men hví tey vildu tað, kom hann ikki nærri inn á. Tað svarið hevði eyðvitað verið, at hægri lærustovnar í Danmark eru latir, og tíma ikki at lesa miðnámsprógvini hjá umsøkjarum, men lata eitt miðaltal gera av, um næmingar koma inn á útbúgvingarnar ella ikki. Eins og hjá letinginum William Farish er karakterskipanin ein umbering til at sleppa undan at gera eitt dygdargott arbeiði.

Ein áhoyrari spurdi, hví tølini í 7-trinstiganum eru so løgin: 12, 10, 7, 4, 02, 00, -3. Hví sigur man ikki bara ein stigi frá 0 til 6 ella frá 1 til 7? Svarið var, at man miðar eftir einum normalbýti, har 7 er miðjan, og so eru tveir karakterir báðumegin 7-talið, og tá eru metini 00 og -3 ikki tald við. Karakterirnir skulu verða býttir soleiðis – í samsvari við ECTS:

**Talva 2. Karakterbýti í 7-trinstiganum sum intervall.**

| Met | 02 | 4 | 7 | 10 | 12 |
|---|---|---|---|---|---|
| Frá til | 2-3 | 3-5½ | 5½-8½ | 8½-11 | 11-12 |
| Býti | 10% | 25% | 30% | 25% | 10% |

Intervallini ímillum karakterirnar eru ásett út frá hesum prosentum. Men tað skuldi ikki verið neyðugt, tí normalbýti sipar til títtleikan av karakterunum, soleiðis at intervallini kundu verið líka stór, sum víst í myndini niðanfyri. Tískil var spurningurin viðkomandi, hví 7-trinstigin ikki bara var frá 0 til 6 ella frá 1 til 7.

**Mynd 1. Karakterbýti í ECTS-stiganum sum títtleiki.**




Samanbera vit 7-trinstigan við 13-stigan støddfrøðiliga við miðaltølum í huga, fáa vit hesa talvu, har ovara regla er 13-stigin, og niðara regla er 7-trinstigin:

**Talva 3. 13-stigin og 7-trinstigin samanbornir.**

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 00 | 03 | | 5 | 6 | 7 | 8 | | 9 | 10 | 11 | 13 |
| | | −3 | 00 | 02 | 4 | | 7 | | 10 | 12 | |

Nógvir lærarar hveppa seg við at geva -3, tí sálarfrøðiliga fellur tað fyri bróstið. Men støddfrøðiliga er -3 ikki verri enn ilt. Ein, sum fær -3 fyri einki at duga, sleppur væl, tá ið hugsað verður um, at 02 í miðal er nóg mikið fyri at lúka prógv; eitt 7-tal kann viga upp ímóti einum -3-tali. Í 13-stiganum skuldi eitt 9-tal til fyri at uppviga eitt 03, og eitt 11-tal var ikki nóg mikið fyri at uppviga eitt 00 í 13-stiganum.

Hetta vísir, hvussu høpisleyst tað er at rokna miðaltøl eftir 7-trinstiganum. Tað er at misnýta tøl. Miðaltøl eftir 13-stiganum góvu lítla meining, men miðaltøl eftir 7-trinstiganum geva onga meining.

## Karakterstigar í øðrum londum

Hyggja vit at karakterstigum í øðrum londum, síggja vit, at teir eru rættiliga ymiskir. Tað er ringt at finna tvey lond við júst sama stiga. Í summum londum eru ikki somu stigar galdandi á miðnámi og hægri námi. Eisini síggja vit, at lond ofta broyta karakterstigar. Í talvu 4 eru nøkur dømi um karakterstigar á miðnámi.

**Talva 4. Karakterstigar á miðnámi í nøkrum londum í Evropa.**

| Land | Stigi | Trin |
|---|---|---|
| Eysturríki | 1-5, har 1 er hægsta met, og 5 er ikki staðið | 5 |
| Finnland | 10-4, har 10 er hægsta met, og 4 er ikki staðið | 7 |
| Frankaríki | 20-0, har 20 er hægsta met, og minni enn 7 er ikki staðið | 21 |
| Italia | 10-1, har 10 er hægsta met, og minni enn 6 er ikki staðið | 10 |
| Ísland | 10-0, har 10 er hægsta met, og minni enn 5 er ikki staðið | 11 |
| Niðurlond | 10-1, har 10 er hægsta met, og minni enn 6 er ikki staðið | 10 |
| Noreg | 6-1, har 6 er hægsta met, og 1 er ikki staðið | 6 |
| Ongland | 9-1, har 9 er hægsta met, og 4 er standard pass | 9 |
| Spania | 10-0, har 10 er hægsta met, og minni enn 5 er ikki staðið | 11 |
| Svøríki | A, B, C, D, E, F, har A er hægsta met, og F er ikki staðið | 6 |
| Týskland | 15-0, har 15 er hægsta met, og minni enn 5 er ikki staðið | 16 |

Keldur: Undervisningsministeriet, betænkning nr. 1453, november 2004. BBC, The 9-1 grading system explained, August 2020. Swedish Grades, Skolverket 2017.

Talvan kundi víst fleiri lond, men hetta er nóg mikið fyri at vísa, hvussu ymiskir stigarnir eru í ymsum londum. Til dømis hava hesir stigar millum 5 og 21 trin; og sjálvt stigar við líka nógvum trinum eru truplir at samanbera, tí markið fyri staðið er ikki tað sama. Í summum londum er hetta mark ikki knívskorið, tí tey skilja ímillum at fáa prógv og at sleppa víðari.

Sum heild kunnu vit siga, tá ið vit kanna søguna um karakterstigar, og hvussu ymiskir karakterstigar eru í ymiskum londum, at tað er eingin rættur karakterstigi. Øll trilva seg fram í blindum, og hvørja ferð ein nýggjur stigi hevur verið royndur eina tíð, koma atfinningar, og so kemur kanska ein nýggjur stigi, sum heldur ikki er tann rætti.

## Hava karakterstigarnir verið til nakra nyttu?

Hetta kundi bent á, at karakterir og karakterstigar hoyra ikki heima í undirvísing og læring. Karakterstigar hava vit fyri, at tað skal vera lættari hjá skúlum at taka næmingar inn. Karakterstigar eru ikki neyðugir til at gera av, um ein næmingur lýkur prógv. Til tað kann man brúka staðið ella ikki staðið.

Eitt er, at karakterir verða brúktir til summativa meting: at skriva endalig prógv, sum næmingurin kann brúka, tá ið hann søkir starv ella søkir inn á víðari útbúgving. Annað er, at karakterir verða brúktir í ólukkumát at meta um avrik hjá næmingum, meðan teir læra. Nógv gransking seinastu 30 árini vísir, at tað er skaðiligt fyri læringina at døma næmingin við einum tali ella bókstavi, meðan hann er í ferð við at læra. Ilt er at skilja, hví vit gera hetta. Ein orsøk er helst, at tað er ringt at sleppa av við gamlar vanar. Ein onnur orsøk er, at tað er ásett við lóg, at vit skulu geva støðumet í skúlaárinum og ársmet, sjálvt um fakið ikki er endaligt. Ein triðja orsøk er, at næmingarnir vilja hava karakterir fyri at vita, hvar teir flóta, sum tikið verður til.

Til hetta síðsta er at siga, at tað er púra óneyðugt at brúka ein karakter at fortelja einum næmingi, hvar hann flýtur. Karakterurin sigur næstan einki. Her er tað aftur letin, sum spøkir. Tað er nógv lættari at skriva eitt tal, enn at seta seg inn í, hvar næmingurin er í læringstilgongdini. Í kjaki við skúlafólk fáa vit, sum mæla til at minka um karaktergeving, skotið í skógvarnar, at tað er leti ikki at tíma at geva karakterir. Hetta er ein tragikomisk grundgeving, tí veruleikin er tað øvugta.

Ein sálarfrøðilig orsøk til, at góðir næmingar vilja hava karakterir, er, at teir eru vanir við hetta frá framhaldsdeildini, og teir hava brúk fyri viðurkenning. Tað er eins og rúsevni, sum tey eru blivin bundin at. Sálarfrøðiliga er hetta ikki sunt, tí hetta er ein viðurkenning frá øðrum, sum er treytað av, at ein er betri enn onnur. Tað hevur nógv størri týdning, at ein viðurkennir seg sjálvan, sum ein er.

Karakterir geva ikki næmingum djúpt innlit, men fáa teir heldur at læra at endurgeva úr lærubókum. Karakterir eggja ikki til kritiska hugsan, tí tað telur ikki í einum skúla, sum hevur karakterir sum grundvøll. Heldur ikki stimbra karakterir til størri áhuga fyri fakinum, og teir fremja ikki samstarv, men kapping. Saman við standardiseraðum førleikamálum forða karakterir eisini fyri kreativari hugsan.

Karakterir á miðnámi, serliga próvtøkur, mangla validitet og reliabilitet[1], tí vit leggja størri dent á at fáa næmingar at hava ávísa atferð enn at fáa teir at hava veruliga fatan. At hetta

---

[1] Sí grein í Miðnámsriti 12, 2017: Hví próvtøkur ikki eru eftirfarandi.

skal vera nýtt við 7-trinstiganum, er ikki sannlíkt, men kanska er tað styrkt, tí nú verður beinleiðis skrivað, at tað ræður um ikki at gera mistøk. Í læringini kann tað vera gott at gera feilir og brølarar, sum ein kann læra av. Ein fyrrverandi næmingur fortaldi mær:

> *Eg fekk 11 í hesum fakinum, men eg skilti ikki tað, sum eg gjørdi. Eg lærdi meg bara at svara soleiðis, sum lærarin lærdi okkum, at vit skuldu gera til próvtøkuna.*

Og hetta er ikki eindømi. Næmingar fáa góðar karakterir, men skúlin dumpar.

Námsætlanir, sum áseta standardiserað førleikamál, leggja ikki upp til at fáa næmingar at hugsa kreativt ella originalt. Fólk, ið eru øðrvísi, og ikki passa inn í tann standardiseraða skúlan, fáa ofta vánalig met, hóast tey kunnu hava potentiali til nakað stórt. Summi av teimum, sum klára seg illa í skúlanum (mált í karakterum), lata seg ikki tøla, men standa ímóti. Hetta mótstøðuføri er ein eginleiki, sum ger, at tey koma sær fram seinni. Nógv dømi eru um fólk, sum fingu vánalig met í skúlanum, men seinni gjørdu seg galdandi – eisini í Føroyum. John B. Gurdon (f. 1933) er ein av mongum, sum fingu vánalig met og ummæli á miðnámi. Tá ið hann gekk á Eton Bording School, skrivaði lærarin í Science soleiðis um hann (1949):

> *… several times he has been in trouble, because he will not listen, but will insist on doing his work in his own way. I believe he has ideas about becoming a scientist; on his present showing this is quite ridiculous. If he can't learn simple biological facts he would have no chance of doing the work of a specialist, and it would be share waste of time, both on his part, and of those who have to teach him.*

Avleiðingarnar av hesum ummæli vóru, at hann bleiv flokkaður niðast ímillum teir vánaligastu næmingarnar í sínum árgangi, og at hann slapp ikki at hava nakað náttúruvísindalig fak tey næstu trý árini har á skúlanum. Kortini eydnaðist honum at sleppa inn á University of Oxford, og í 2012 fekk hann Nobel prísin í fysiologi ella medisini.

Men onnur, sum fáa vánaligar karakterir, halda, at so eru tey einki verd, og tí loysir seg ikki at royna at blíva til nakað. Fyri tey, sum fáa góðar karakterir á miðnámi, er tað kanska gott, og friður veri við tí. Men fyri tey, sum fáa vánaligar karakterir, og sum harvið missa trúnna á egin evni, eru karakterirnir ein vanlukka. Og samfelagið missir eisini, tí menniskjalig evni og tilfeingi ikki verða gagnnýtt.

Summir lærarar á miðnámi føra fram:

> *Næmingarnir eru komnir á miðnám fyri at fáa eitt atgongumerki til hægri útbúgving, og tað atgongumerkið er at fáa góðar karakterir. Teir eru ikki komnir her fyri at læra, men fyri at fáa góðar karakterir. Soleiðis eru treytirnar, og tað mugu vit liva við.*

Men mugu vit tað? Skulu vit finna okkum í at vera partur av einari sjúkari skúlaskipan? Aðrastaðni í verðini gera lærarar áhugafeløg, sum stríðast ímóti karaktergeving í skúlanum. Um eingin andøvir ímóti, broytist einki.

Spurningurin, um vit skulu hava ein karakterstiga ella ein annan, fyllir nógv. Men veruleikin er, at tað hevur ikki stórvegis týdning, um ein karakterstigi hevur 5 ella 10 trin. Tað hevur nógv størri týdning, at vit eru tilvitað um, hvussu karaktergeving skaðar og forðar fyri læring, og hvussu hon kann oyðileggja lívið hjá evnaríkum næmingum, sum onkursvegna ikki passa inn í skúlaskipanina.

## Keldur

Mark W. Durm, An A Is Not An A Is Not An A: A History Of Grading, *The Educational Forum*, vol. 37, Spring 1993.

Nobelförsamlingen, Press release, The Nobel Prize in Physiology or Medicine 2012: https://www.nobelprize.org/prizes/medicine/2012/press-release/

Teachers Going Gradeless: https://teachersgoinggradeless.wordpress.com/

Teachers Throwing out Grades Library: https://ttoglibrary.wordpress.com/

Thom Hartmann, A short history of grading úr bókini *Complete Guide to ADHD*, 2000.

Undervisningsministeriet, *Betænkning om indførelse af en ny karakterskala til erstatning af 13-skalaen*, november 2004.

# Karakterfundir eru frá eini farnari tíð

Tórður Johannesarson

**Á øllum miðnámsskúlum er siðvenja at hava karakterfundir. Um tú spyrt teg fyri, er svarið, at soleiðis plagdu vit at gera. Fá munnu vita, at hesir fundir hoyra til eina tíð, tá ið lítið var granskað um karakterir, og tí eru karakterfundir ein tíðarvilla – ein anakronisma.**

## Karakterfundir sum siðvenja

Á hesum karakterfundum eru lærаratoymini savnað saman við lestrarvegleiðara. Á summum skúlum eru eisini umboð fyri leiðsluna við. Tann elsti av studentaskúlunum, Studentaskúlin og HF-skeiðið í Hoydølum, hevur í mong ár havt karakterfundir, helst líka síðan skúlin byrjaði. Tá ið teir smáu studentaskúlarnir komu, fylgdu teir hesi siðvenju. Allir vinnuskúlarnir uttan Handilsskúlin í Havn hava havt hetta slagið av fundum. Eg havi spurt meg fyri millum lærarar og leiðslur í fólkaskúlanum; har verða ikki karakterfundir brúktir.

Næmingar á miðnámi fáa tvær ferðir um árið støðumet, tó ikki fyrsta árið á búskaparbreyt og FHS á Glasi, har næmingarnir fáa eitt støðumet. Tað er ójavnt, nær støðumetini verða givin, men tey munnu liggja millum november og mars. Tá ið freistin fyri at hava givið støðumetini er farin, skipa miðnámsskúlarnir fyri karakterfundum. Summir skúlar kalla karakterfundirnar fyri toymisfundir, men endamálið er at tosa um karakterir. Á karakterfundunum verða øll støðumetini, sum lærarar hava givið næmingunum, kunngjørd á einum blaði ella á einum skíggja. Lærarar sita so og hyggja at metunum, og tosað verður um karakterirnar hjá einstaka næminginum ella flokkinum.

Tey, sum ganga inn fyri karakterfundum føra fram, at tað er týdningarmikið, at lærarar síggja, at ein næmingur klárar seg væl ella illa í onkrari lærugrein; so kunnu teir fáa eina frágreiðing um, hví hesin klárar seg so væl ella illa – og kunnu teir møguliga broyta okkurt í síni lærugrein. Eisini verður sagt, at karakterfundir eru eitt gott høvi hjá toyminum at tosa saman um einstakar næmingar, flokkin ella um karakterirnar. Á summum miðnámsskúlum verður ein samanbering gjørd millum seinasta met og nýggjasta met. So hoyra lærarar, hvørt karakterirnir eru farnir upp ella niður hjá næmingunum. Eru karakterirnir hjá onkrum næmingum farnir munandi niður, kann ein lestrarvegleiðari tosa við hesar næmingar. Teir lærarar, sum halda, at tað er gott við slíkum fundum, siga, at tað er ein trygd hjá teimum, at teir at síggja, at teir eru á rættari kós í karakatergevingini.

Á slíkum fundum er ikki óvanligt at hoyra lærarar siga:

- Eg síggi, at eg eri tann einasti, sum hevur givið hesum 02, tí at næmingurin hvørki dugir ella tímir nakað!
- Eg síggi, at eg havi verið ov bleytur!
- Eg havi nokk verið ov harður!
- Eg gevi ikki 02 fyri ikki at taka mótið frá henni, sjálvt um tað er uppiborið!
- Eg gevi honum ikki 10, sjálvt um hann hevur tað uppiborið, tí so slakar hann av, vænti eg!

Og ikki er óvanligt við verjurøðum hjá onkrum lærara, sum er tann einasti, ið hevur givið einum næmingi 02. Tað kann virka sum, at viðkomandi skal sannføra eitt nevningating um, at hann hevur borið seg rætt at.

Tað er ikki óvanligt, at ein næmingur fær góðar karakterir í eini lærugrein, men vánaligar karakterir í øðrum lærugreinum. Flestu okkara høvdu nakrar yndislærugreinir, sum vit dyrkaðu, tá ið vit gingu á miðnámi, meðan aðrar lærugreinir dámdi okkum kanska ikki so væl, tí at okkum ikki dámdi undirvísingina, lærugreinina ella lærutilfarið. Á karakterfundunum kemur hetta eisini til sjóndar, tí at summir lærarar kunnu undrast á, hví onkrir næmingar fáa so høg ella lág met í hinum lærugreinum. Tað er ikki óvanligt, at næmingar klára seg væl í lærugreinum, har tøl verða nógv brúkt, meðan teir klára seg minni væl í málsligum lærugreinum, ella øvugt. Onkursvegna er eitt forstáilisi fyri hesum á karakterfundunum, tí at frágreiðingin liggur í mytuni um, at summir næmingar ikki duga at rokna, meðan aðrir ikki duga mál. Mínar royndir frá karakterfundum eru, at lærarar verða frustreraðir yvir, hví ein næmingur fær góð met í t.d. føroyskum, men ikki í eingilskum og donskum, tí at talan er um mál. Havi eisini hoyrt, at lærarar undrast á, at ein næmingur fær góðan karakter í støddfrøði, men ikki í virkisbúskapi, tí at her er rokning ein felagsnevnari. Tá sita hesir báðir lærararnir og undrast og kjakast, og hugburður til ymiskt kemur fram. Tá kann tað henda, at annar teirra følir seg illa, fer so at ivast í, um hann hevur gjørt okkurt skeivt námsfrøðiliga, fakliga ella menniskjaliga. Ein avleiðing kann vera, at viðkomandi verður ávirkaður av hugburðinum hjá hinum ella øðrum í toyminum. So til næsta karakterfund hevur viðkomandi møguliga broytt karakterin við teirri hugsan, at hini geva ikki næminginum góðan ella vánaligan karakter, og kennir hesin seg noyddan at gera tað sama sum hini. Um slíkt hendir, hava karakterfundir ikki verið eitt heppið forum, og offrið gerst næmingurin. Sum nevnt klára næmingar seg so ymiskt í ymisku lærugreinunum, tí er tað púra natúrligt, at spjaðing er í karakterunum hjá summum næmingum.

Vit kunnu eisini spyrja, um tað er rætt at hava karakterfundir. Ein karakterur ella eitt støðumet er rættiliga privat; hann er millum lærara, leiðslu, umsiting og næming. Eg sum lærari havi ongan áhuga í at síggja, hvat aðrir lærarar geva, tí at eg kann bara staðfesta,

hvat fer fram í míni lærugrein. Spurningurin er, um tað er rætt, at so nógvir lærarar síggja metini hjá næmingunum. Karakterir eru sera persónligir og viðkvæmir fyri nógvar næmingar.

## Toymisfundir

Sum heild munnu karakterfundirnir á miðnámi byggja á eina sera gamla siðvenju. Samfelagið, undirvísingarhættirnir og námsfrøðin eru broytt. Fundirnir stava frá eini tíð, tá ið millum lítið og einki var granskað í karakterum og læring. Tá í tíðini vóru spurnartekin ikki sett við karakterir, teir vóru næstan tann einasta eftirmetingin, sum bleiv brúkt. Tá á døgum vóru tað eisini tey bókliga bestu, sum sluppu á miðnámsskúla. Nú fara eini 90% av ungdóminum á miðnám, so onkursvegna kunnu vit seta spurnartekin við karkaterfundir í núverandi líki.

Formativ meting hevur sum endamál, at næmingurin skal læra: læra háttaløg, læra at hugsa fakliga og tvørfakliga. Búgving (dannelse á donskum, og Bildung á týskum) er eitt hugtak, sum sipar til, at næmingurin skal búnast og mennast – og ikki bara útbúgvast. Siðvenjan við karakterfundum fremur ikki búgving.

Nú á døgum hava vit aðrar eftirmetingarhættir enn karakterir; granskarar mæla frá at seta fokus á karakterir. Hepnari hevði verið, at havt toymisfundir á miðnámi uttan karakterir, har fokus var á læring, og hvussu vit kunnu hjálpa næminginum at mennast.

# Vísindaástøði fyri 1s – ein áhugaverd innleiðsla til miðnám?

Christian N. Ihlen

**Í grannalondum okkara er frálæra í vísindaástøði á miðnámi. Vit hava í nøkur ár gjørt tað sama, men spurningurin er, hvussu umfatandi henda frálæran um vísindi skal vera. Hvat er endamálið við hesi frálæru?**

Í námsætlanini til miðnám fyri lestrarmenning frá 2013 stendur um frálæruna í vísindaástøði: ”Vísindaástøði er um sannkenningarmøguleikar og tilgongdir, ið vísindi nýta at lýsa og meta um heimin, vit liva í, bæði um kosmos, náttúruna, samfelagið og menniskjuna. Vísindaástøði viðger m.a. deduktivt og induktivt arbeiðslag, kvalitativar og kvantitativar kanningar, empiri (dátugrundarlag) og ástøði”.

Vísindaástøði er lutvíst ein ung lærugrein innan heimsspeki; serliga hesi seinastu 150 árini hevur vísindaástøði av álvara tikið seg fram. Hvussu hevur søguliga gongdin verið í frambrotunum innan vísindini? Hvussu hevur menniskjan arbeitt seg fram til nýggjar fatanir og uppdagingar innan vísindini? Hetta eru stórir spurningar, sum eru torførir at svara, men eitt av endamálunum í frálæruni í vísindaástøði er, at næmingarnir fáa eina fatan av, hvørjar styrkir og avmarkingar eru í vísindi.

Endamálið er at læra næmingarnar at vera atfinningarsamar og duga at ”reflektera” um ta vitan, teir fáa. Endamálið er eisini at geva næmingunum møguleika á skikkaðum grundarlagi, at seta spurningar til vitanina, teir fáa og vitan um, hvaðani vitanin hevur uppruna. Um ikki, stendur næmingurin við “óreflekteraðaðari” vitan. Hetta er tað sama sum munurin á tí “dannaða” menniskjanum og tí “ódannaða” menniskjanum, á tí upplýsta, sjálvstøðuga og mynduga menniskjanum mótvegis tí óvitandi, ómynduga og “manipuleraða” menniskjanum.

Vísindaástøði og arbeiðsháttur (metoda) verða søgd ikki at vera tað sama. Men í nógvum førum hanga hesi saman. Greinin ella uppskot til undirvísing í vísindaástøði niðanfyri er eitt dømi um, hvat ein stutt innleiðsla til vísindaástøði kann fevna um, og sum vónandi kann hava tað við sær, at lærugreinirnar á gymnasialum miðnámi kunnu byggja víðari á soleiðis, at næmingarnir á einum tilvitaðum grundarlagi kunnu taka støðu til vísindini!

# Vísindaástøði í lestrarmenning

## Hvat eru vísindi?

Nógvar allýsingar eru av vísindi. Samanumtikið leita vísindi eftir vitan. Vanliga myndin, vit síggja fyri okkum í sambandi við vísindi, er ein maður ella kvinna í hvítum klæðum, sum gera royndir í eini royndarstovu (laboratorium) við ymiskum mátitólum. Hetta er tó bert eitt slag av vísindi, nevniliga náttúruvísindi.



## Náttúra, menniskja og samfelag

Vanliga býta vit vísindini sundur í náttúruvísindi, hugvísindi og samfelagsvísindi. Náttúruvísindi kanna livandi og deyð fyribrigdi í náttúruni og royna at finna fram til lógir í náttúruni, eisini nevndar náttúrulógir. Í hugvísindi og samfelagsvísindi er áhugin í minni mun at finna vísindaligar lógir, men heldur at skilja fyribrigdi. Hetta er tó eisini galdandi fyri náttúruvísindi.

Í hugvísindum snýr tað seg um at skilja hugsanir, m.a. at greina ætlanir, meiningar og endamál. Henda vísindagrein granskar serliga mál, bókmentir, list og søgu.

Samfelagsvísindi snúgva seg um menniskju í samfelagnum. Tey snúgva seg lutvíst um at skilja støðuna hjá menniskjuni, men nýta eisini náttúruvísindalig amboð, t.d. hagtøl og eygleiðingar.

## Skúlin og vísindi

Í skipanini av gymnasialum miðnámi síggja vit hesa sundurbýting. Sí talvuna niðanfyri.

Dømi um lærugreinir innan ymisku høvuðsøkini:

| Hugvísindi | Náttúruvísindi | Samfelagsvísindi |
|---|---|---|
| fornaldarfrøði | alisfrøði (fysikk) | samfelagsfrøði |
| tónleikur | evnafrøði (kemi) | búskaparfrøði |
| mál m.a. føroyskt | lívfrøði | sosiologi |
| myndlist | geologi | stjórnmálafrøði |

## Vísindi og arbeiðshættir

Í roynd og veru eru vísindi partur av øllum evnum. Tú kanst arbeiða vísindaliga við spurninginum um, hvussu heimurin varð skaptur (innan alisfrøði ella átrúnað). Tú kanst granska, hvussu samfelagsbúskapurin verður stýrdur (innan búskaparfrøði og samfelagsfrøði). Tú kanst kanna, hvat fotosyntesan er (lívfrøði og evnafrøði), ella hvat skaldsøgan hjá Williami Heinesen ”Den sorte gryde” í grundini snýr seg um (í føroyskum/donskum og bókmentafrøði), eins og tú kann granska málsøgu í føroyskum og søgu.

Hví hevur tað týdning at læra um vísindaástøði? Jú, vísindaástøði liggur sum grund fyri, hvørjir arbeiðshættir (metodur) verða brúktir at savna saman og skapa vitan. Arbeiðshættir verða býttir sundur í kvantativar og kvalitativar arbeiðshættir (sí fylgiskjal nr. 1). Kvantitativir arbeiðshættir verða brúktir til at kanna tað, sum kann teljast. Kvalitativir arbeiðshættir verða brúktir til at skilja og tulka tekstir av ymiskum slagi, t.d. politisk, mentanarlig og onnur viðurskifti.

Ein háttur at brúka vísindaástøði er at seta upp útsagnir (hypotesur), ið verða søgd at vera vitan. Vit fyrihalda okkum atfinningarsamt til spurningar og spyrja, hvussu vit eru komin fram til hesa vitan, og hvørjar fyritreytir liggja sum grund fyri vitanini. At enda kunnu vit vátta ella avsanna hesar útsagnir. Hetta amboð hevur stóran týdning í hesum tíðum, nú miðlarnir eru fullir av Fake News, tilvitaðum villleiðingum og skeivleikum.

Vísindini hava nógv til felags, men eru eisini sera ymisk. Arbeiðið hjá einum alisfrøðingi í eini royndarstovu (laboratorium) er heilt øðrvísi enn arbeiðið hjá einum bókmentafrøðingi, sum arbeiðir við greining og tulking av eini skaldsøgu. Hetta er aftur heilt øðrvísi frá arbeiðinum hjá einum samfelagsfrøðingi, ið t.d. ger samrøður við fólk um, hvørji virði føroyingar hava.

Sum áður nevnt, er siðvenja at býta vísindi í tríggjar megindeildir, sum einstøku vísindini og lærugreinarnar eru knýttar at. Í dag verður tó lagdur dentur á at arbeiða tvørfakligt. T.d. er krav um, at brúka tvær lærugreinir í tvørfakligum samanhangi, tá breytarverk-

ætlanin í 3.s skal gerast. Fyri at fáa eina grundleggjandi fatan av yvirskipaðu mununum á hesum trimum høvuðsdeildunum ber til at skilja ímillum trý eyðkenni:

- Hvat verður kannað, og hvat er evnið innan ymisk vísindaøki?
- Hví verður hetta kannað, og hvat er endamálið hjá ymiskum vísindaøkjum?
- Hvussu verður hetta kannað? Hvørjir arbeiðshættir verða brúktir innan ymisk vísindaøki?

## Um hugvísindi



### Hvat verður kannað í hugvísindum?

Hugvísindi eru tað, sum menniskjan sjálv hevur skapað og hugsað. Tað kann snúgva seg um talað ella skrivað mál, tekstir frá ymiskum tíðarskeiðum, myndir, bygningar, listaverk av ymiskum slagi o.s.fr. Tað kann vera ein avbjóðing at seta seg inn í, hvat aðrar mentanir ímynda sær, at fata ein tekst úr miðøldini, skilja eina symfoni eftir Beethoven ella á annan hátt at seta seg inn í hugaheimin hjá øðrum menniskjum.

Tekstir, myndir, keldur, sum hugvísindi arbeiða við, eru ikki eins, og tí siga vit, at tað, sum hugvísindi fást við, er serstakt (unikt). Hetta verður nevnt idiografisk vísindi (sí fylgiskjal nr. 2). Orðið idiografisk merkir á forngrikskum ”tað, sum er serstakt”. Dømi um hetta kunnu verða tey føroysku kvæðini. Hugvísindaligu lærugreinirnar kanna tað, menniskjan hevur skapað sum eindømi, og sum altíð hava ein serligan týdning, av tí tær hava sín uppruna í tilvitskuni hjá menniskjum.

### Hví kanna tað, menniskjan hevur skapað?

Stutta svarið er: fyri at skilja og greiða frá øllum, ið menniskjan hevur skapað og skapar. Eitt heldur drúgvari svar er, at tað snýr seg um at skilja okkum sjálv, lívið hjá menniskja-

num og gerast betur til at liva okkara lív við at læra fatanir, virði, argument, hugmyndir, kenslur og ideal, sum menniskjan hevur borið fram í bókmentum, myndum, tónleiki o.s.fr. gjøgnum øldir. Hugvísindi royna sostatt at skilja menniskjuna gjøgnum tað, sum menniskjan hevur skapað.

Endamálið við hugvísindi er at skilja ætlanir handan gerðir intentionel frágreiðing (sí fylgiskjal nr. 4): Intentión merkir "ætlan", og endamálið hjá hugvísindi eru júst at skilja og greiða frá og lýsa tær ætlanir, sum liggja aftan fyri t.d. eitt listaverk. Hetta sama gera bókmentafrøðingar og søgufrøðingar, ið kanna ætlanina við skaldsøgum ella søguligum tíðarskeiðum og hendingum.

### Hvussu gera vit hugvísindaligar kanningar?

Hvat, ið vísindi kanna, er altíð avgerandi fyri, hvussu vit kanna eitthvørt. Tá listaverk við ávísum týdningum verða granskað, royna vit at tulka hesi listaverk. Okkara hugaheimur, kenslur, hugsanir og ætlanir eru ikki sjónligar og kunnu ikki mátast. Vit kunnu t.d. ikki síggja ella máta ætlanirnar við eini yrking ella meiningar í einum kjaki. Tí mugu vit tulka og liva okkum inn í tað, sum onnur menniskju hava framleitt. Ein tulkingarháttur, ið verður brúktur innan hugvísindi til tulking, nevnist hermeneutikkur (hermeneutikkur merkir "læran um, hvussu alt, ið hevur týdning, kann/skal skiljast ella tulkast"). Hugvísindi eru hermeneutisk: tær tulka meiningar, týdningar og ætlanir aftan fyri list t.v.s. bókmentir, myndlist, tónleik o.s.fr. Í kanningarháttinum verður tann hermeneutiski spiralurin nýttur (sí fylgiskjal nr. 3). Kanningarhátturin, sum hugvísindi nýta verður nevndur tann kvalitativi kanningarhátturin (sí fylgiskjal nr. 1).

## Um náttúruvísindi



## Hvat kanna vit í náttúruvísindi?

Náttúruvísindi kanna náttúruna, her undir náttúruskaptar lutir og gongdina í náttúruni. Hesi fyribrigdi eru ofta lógarfest í náttúruni, t.d. tyngdarlógini. Náttúruvísindi eru fjøl-broytt og kanna so ymisk fyribrigdi sum djór, plantur, mannakroppar, veðurlag, atom, sólarskipan, høv, jarðarviðurskifti o.s.fr.

Náttúruvísindi eru grundað á ítøkiligar royndir. Vitanin kemst av uppdagingum, ið eru fingnar til vega gjøgnum kanningar. Øll vísindi seta spurningar, tá eitt fyribrigdi skal kannast: hvat er hetta? Er hetta eitt súrepli, ein yrking, ein vøra ella ein foton?

Náttúruvísindi kanna í høvuðsheitum almenn, universell og lógarbundin fyribrigdi í náttúruni. At tað er lógarbundið og universielt, merkir, at tað er æviga galdandi og í øllum førum. Náttúruvísindi eru í høvuðsheitum nomotetisk vísindi (sí fylgiskjal nr. 2). Á forn-grikskum merkir nomos ”lóg”, og tihthenai merkir ” at seta fram, fastseta” ástøði um náttúruna. Í summum førum eru náttúruvísindi tó idiografisk, t.d. tá geografar granska serstøk støð ella øki.

Náttúran tosar ikki sjálv, lutirnir í náttúruni siga ikki frá sjálvir, hvussu teir eru vorðnir til, og hvørjum samanhangi teir eru vorðnir til í. Ofta verður sagt, at náttúruvísindi hava eitt eindarmál, sum granskarar úr øllum heiminum skilja.  Tílík universell eindarvísindi eru hevjað upp um einstaka granskaran, yvir tíð og stað, mentan og søgu, eru merkt av objektiviteti og prógvaðum sannroyndum. Hetta myndar eitt ideal fyri øll vísindi.

Tað vísindaástøðiliga hugtakið, sum verður nýtt og er endamálið við náttúruvísindini er at geva kausalar frágreiðingar (sí fylgiskjal nr. 4). Týdningurin av hugtakinum kausal er ”tað, sum viðvíkur “orsaks-og-árins-virðurskifti”, har tað ræður um, at seta fram so almenn ástøði sum møguligt um, hvussu náttúran ber seg at.

## Hví kanna nattúruvísindi náttúruna?

Stutt kann sigast, at endamálið við at kanna náttúruna er at skilja tað almenna og lógarbundna í náttúruni, hvussu fyribrigdi og lutir hátta sær, t.d. gosfjøll, plantur, menniskjaheilin ella ódnir. Endamálið er við øðrum orðum at seta fram universellar frágreiðingar um orsakir og áseta náttúrulógir fyri hesi náttúrufyribrigdi. Tað djúpa endamálið er at skilja náttúruna, sum vit eru ein partur av. Eisini í mun til at gagnnýta náttúrutilfeingi (t.d. í sjónum) betur og at menna nýggjan heilivág, útvega reint vatn, og læra, hvussu vit skulu ansa eftir náttúruni.

Nattúruvísindi verða í høvuðsheitunum søgd at verða faktuell (sí fylgiskjal nr. 5), sum merkja, at tey við støði í eygleiðingum og ymiskum data royna at prógva ella mótprógva útsagnir/úrslit, tá kanningar verða gjørdar.

## Hvussu kanna náttúruvísindi fyribrigdi og lutir í náttúruni?

Náttúruvísindi eru grundað á eygleiðingar og vísindaligar royndir. Náttúruvísindi eru also grundað á empiriska vísindi = grundað á at savna eygleiðingar og royndir inn.

Í náttúruvísindum verður tann kvantativa tilgongdin í høvuðsheitum brúkt. Tann kvantitativa tilgongdin (sí fylgiskjal nr. 1) er nýtilig til tess at fáa svar upp á ymiskt, vit undrast á. Náttúran er lutfalsliga einføld á tann hátt, at náttúrufyribrigdi oftast eru knýtt at einum ella fáum variablum, ið kunnu setast upp í støddfrøðiligar formlar. Vanligt er at siga, at hugvísindi ella samfelagsvísindi ofta eru tengdar at fleiri ymiskum viðurskiftum, variablum og samanhangum.

Ein nógv nýttur arbeiðsháttur í náttúruvísindini er tann hypotetiski-deduktivi arbeiðs-hátturin (sí fylgiskjal nr. 6). Hvat merkir so hetta hugtak? Vit kunnu svara spurninginum við at býta hugtakið í tveir partar: Hypotesa merkir, "at vit halda, at so er" ella "sann-líkindini fyri" ella ein møguligt frágreiðing", meðan deduktiv ella at deducera hevur tann týdning, at vit " gera ein úrskurð" ella, at vit fara frá einum yvirskipaðum spurningi til eindømi og gera alment galdandi niðurstøður.

Ein annar arbeiðsháttur er induktivi arbeiðshátturin (sí fylgiskjal nr. 6) og er hetta ein øðrvísi arbeiðsháttur, tí vit fara frá at hava eygleitt tað einstaka (t.d. vøksturin hjá plantunum) og til niðurstøðu um, at hetta er alment galdandi. Induktión merkir, at vit gera niðurstøður útfrá einstøkum dømum til alment galdandi niðurstøður, grundgevingar ella ástøði.

## Um samfelagsvísindi



## Hvat kanna samfelagsvísindi?

Samfelagsvísindini kanna samfelagið, t.v.s. menniskjaligar felagsskapir, stórar sum smáar. Samfelagsvísindi kanna sosial (sosiologi), búskaparlig (búskaparfrøði) og politisk viðurskifti (stjórnmálafrøði/politologi) og granska í samfelagsviðurskiftum og samfelagsgongd bæði alheims og staðbundið (globalt og lokalt).

## Hví kanna samfelagsvísindi samfelagið?

Svarið er í stuttum: fyri at skilja samfelagið og fyri at gera samfelagið betri at liva í. Samfelagsvísindaligar kanningar eru grundaðar á empiri og ástøði og verða gjørdar fyri ymiskar samfelagsstovnar, t.d. Búskaparráðið, ið hevur áhuga fyri búskaparligum útlitum í Føroyum. Eisini verða sosial og mentanarlig viðurskifti kannað. Samfelagsfrøðingar á Setrinum gera kanningar og tilráðingar um politisk, sosial og búskaparlig viðurskifti o.s.fr., so vit á skilvísan hátt kunnu taka avgerðir grundaðar á serfrøðingavitan. Samfelagsvísindi verða søgd at verða grundað á faktuella vitan og verða eisini søgd at vera normativ (sí fylgiskjal nr. 5).

## Hvussu kanna samfelagsvísindi samfelagið?

Samfelagsvísindini ella sosiologiin tóku seg upp í 1800-talinum orsakað av grundleggjandi samfelagsbroytingum í Evropa, tá modernaða samfelagið byrjaði. Áhugi fyri at skilja marknaðarbúskap kyknaði, tað spírandi fólkaræðið og býarsamfelagið við vaksandi arbeiðsspesialisering.

Hildið verður, at samfelagsvísindi eru sera tilvitað um, hvørjir arbeiðshættir verða brúktir í samfelagsvísindaligum greiningum, tí tað, sum verður kannað, er óstøðugari enn tað, sum verður kannað innan hugvísindi og náttúruvísindi. Hugburðir, virði, atferðarmynstur, búskapur o.s.fr. broytast støðugt, og tí er tað torført at máta hetta nágreiniliga. Eisini verða samfelagsvísindi søgd at nýta kausalar og intentionellar frágreiðingar. Í kausalum frágreiðingum verður roynt at finna fram orsakirnar til tað, sum kannað verður. Intentionellar frágreiðingar leggja dent á, hvørjar ætlanir eru aftan fyri tað, sum kannað verður (sí fylgiskjal nr. 4).

Yvirskipað brúka samfelagsvísindi bæði tulkingar og mátingar, tá data verða savnað og greiningar gjørdar av samfelagsviðurskiftum. Samfelagfrøðin fevnir sostatt bæði um hugvísindi og náttúruvísindi og nýtir bæði “bleyt data” og “hørð data”.

Talan er um tríggjar arbeiðshættir, sum verða brúktir í samfelagvísindum: kvantitativan arbeiðshátt, kvalitativan arbeiðshátt (sí fylgiskjal nr. 1) og komparativan arbeiðshátt.

Kvalitativur arbeiðsháttur snýr seg um at tulka tekstir og hvønn týdning teir hava, t.d. politiskar talur ella útsagnir frá politikarum, t.d. útsagnir í sambandi við samrøður, eitt íkast til kjak ella ein dagbók. Hesin arbeiðsháttur fer í dýpdina, men er ikki umboðandi

fyri størri bólkar. Tí er ofta trupult at brúka kvalitativan arbeiðshátt, um vit skulu gera almennar niðurstøður av eini kanning. Talan er um ”bleyt” data og verður hermeneutikkurin nýttur í samfelagsvísindi eins og í hugvísindi.

Kvantitativur arbeiðsháttur snýr seg um at rokna ella telja og savna inn tilfar (data), t.d. spurnabløð um t.d. inntøkuviðurskifti hjá einum bólki í samfelagnum, sum síðan verða viðgjørd hagfrøðiliga. Tann kvantativi arbeiðshátturin gevur grundarlag fyri at kunna gera almennar niðurstøður. Eygleiðingar eru dømi um kvalitativan arbeiðshátt. Vit eygleiða sosialar gongdir, t.d. aktivitetin, interaktiónina og samspæl millum næmingar í einum skúlaflokki, vit kunnu eisini eygleiða normar og virði í einum samfelagsbólki.

Komparativur arbeiðsháttur: komparation merkir ”samanbering”. Vit bera saman ymisk mál ella hendingar, t.d. politiskar skipanir í tveimum londum ella ymiskar mentanir. Endamálið er at skilja eitthvørt samfelagsligt fyribrigdi betur við at síggja hesar hendingar ella mál/”cases”/ borið saman við líknandi mál við at síggja líkskap og munir. Komparativi arbeiðshátturin nýtir bæði kvalitativan (t.d. samanbering av tekstum) og kvantitativan arbeiðshátt (t.d. samanbering av hagtølum).

## Tilfarsskrá

Bertelsen, Lisbeth Haulrig: AT og elementær videnskabteori. 2014.

Ebdrup, Niels: Hvad er videnskaplig metode? Videnskab. 3. marts 2015.

Fink, Hans: Fag og fagsamarbejde i gymnasiet. Í Almen studieforberedelse. Red. Mogens Hansen (Gyldendal 2005).

Fuglesang, Lars, Poul B Olsen: Introduktion. Í Videnskabsteori i samfundsvidenskaberne. (RUC 2007).

Henriksen, Per, Vibeke Allerup Petersen: Metodebogen. (Columbus 2018).

Pedersen, Ole, Peter M Lauritzen, Ole Pedersen. Jesper Rasmussen, Steffen Brunn Christensen og Anja S Søndergaard. Videnskabsteori. Frederikshavn Gymnasium og HF kursus. 2009.

Rangvis, Mads o.a.: Vidensmønstre. Basal videnskabsteori. (Systime 2018).

Steen, Uffe: Videnskabsteori i gymnasiet. Gymnasieskolen. 23. Jan. 2017.

Thuren Torsten: Videnskabsteori for begyndere. (Rosinante 2012).

Vestergård, Gunver Lystbæk: Hvad er videnskab? 27. August 2010. Videnskab.dk.

Work, Hans Henning: Videnskabsteori i gymnasiet – et paradoks. Gymnasieskoen 3. nov. 2009.

## Fylgiskjal nr. 1

| Kvantitativur arbeiðsháttur | Kvalitativur arbeiðsháttur |
|---|---|
| Ein kanning, sum leggur dent á støddir ella mongdir, sum kunnu skrásetast ella mátast í tølum. | Ein kanning, sum leggur dent á eginleikarnar á einum fyribrigdi í einum samfelag. |
| Kann vera mátingar<br>Kann vera uppteljingar<br>Miðar ímóti almennari vitan<br>Kann brúkast við at ”testa” útsagnir (hypotesur)<br>Eru umboðandi (representativar)<br>Leitað verður eftir samanhangum og orsøkum<br>Hugt verður at fyribrigdum uttanífrá = objektivisering<br>Avmarking: Tá vit skulu kanna menniskju! | Fer í dýpdina og er rannsakandi<br>Orsakir, ætlanir, áhugi og kenslur hava stóran leiklut í kanningunum<br>Empiriskt tilfar eru tekstir, samrøður og eygleiðingar<br>Av týdningi, at tú ert greiðir um, hvørji umboða tað, tú skal kanna<br>Tú arbeiðir við tilfarinum, t.v.s. tú tulkar tað, sum verður sagt ella gjørt |
| Kvantitiv tilgongd:<br>Skráseting av eksperimentellum data | Kvalitativ tilgongd:<br>Tulking av eini yrking |

## Fylgiskjal nr. 2

| Idiografisk kanning | Nomotetisk kanning |
|---|---|
| Um vísindi, sum lýsa tað serstaka, ta einstaku hendingina, tað staðbundna<br>Idio: tað serkenda/serstaka | Um vísindi, sum arbeiða við hópum av fyribrigdum og royna at finna fram til varandi samanhangir<br>Nomos= tað, sum hevur við sær skapanin av lógum og reglum |
| Vit kanna tað serstaka og individuella við fyribrigdum<br>Hugvísindaligar lærugreinir arbeiða idiografiskt. Í søgu royna vit at skilja tað einstaka eindømið ella hendingina<br>Idiografiskar kanningar kunnu nýta ástøði. T.d. ástøði hjá Freud í at greina eina skaldsøgu | Kannað verður ein røð av fyribrigdum ella eindømum við atliti at at kunna gera almennar niðurstøður, sum so kunnu greiða frá øðrum eindømum ella fyribrigdum<br>Náttúruvísindi arbeiða nomotetiskt<br>Setir upp klassifikatiónir (flokkingar), sum kunnu lagast til tey einstøku fyribrigdini, t.d. hvørji eru smittað av koronu, og hvørji eru ikki |

**Fylgiskjal nr. 3**




Vit skilja betur ein tekst, um vit hava lisið hann fleiri ferðir, enn um vit bert hava lisið hann eina ferð. Hetta er júst, tí vit gjølla hava skilt og tikið við allar smálutir í tulkingini av heildini, samstundis, sum vit hava tulkað heildina í ljósinum av smálutunum í tekstinum. Myndilin er grundaður á hugtakið "forforståelse", t.v.s. forfatan. Vit hava øll eina forfatan av t.d. einum teksti/skaldsøgu, og við at nýta hermeneutiska spiralin kunnu vit ofta siga, um henda forfatan er sonn ella ósonn.

## Fylgiskjal nr. 4

| Kausal frágreiðing | Intentionel frágreiðing |
|---|---|
| Í eini kaulsalari frágreiðing verður greitt frá við støði í, hvør orsøkin er. ”Causa” merkir ”orsøk” | Í eini intentionellari frágreiðing verður greitt frá við støði í gerðum ella tað, sum verður til, sum úrslit av tí tú ger/hevur gjørt. Hvørji eru motivini og orsakirnar til tað, tú ger ella hevur gjørt? Intentio= hensigt (ætlan) |
| Í eini kausalari frágreiðing verður víst á undanfarnar treytir, sum hava havt við sær eina hending ella gongd<br><br>Ofta eru tað nógvir kausalir faktorar, sum hava týdning | Vit kanna endamál og motiv<br><br>Er knýtt at viðurskiftum, sum eru knýtt at subjektinum (evninum), sum kannað verður, t.d. ein politiskan flokk<br><br>Vit skilja millum impulsiv og driftstýrdan atburð ella tilvitaðar gerðir |

## Fylgiskjal nr. 5

| Faktuell útsøgn | Normativ útsøgn |
|---|---|
| Merkir útsøgn, sum roynir at lýsa, hvussu eitt hvørt fyribrigdi er | Merkir metingar og dømingar av einumhvørjum fyribrigdi, har virðir hava týdning, t.v.s. hvussu eitthvørt fyribrigdi eigur at vera |
| Verður brúkt at siga, hvat er ”faktum”, t.v.s. sannleiki<br><br>Faktuellar útsagnir verða eisini nevndar deskriptivar útsagnir<br><br>Kann vera satt ella ósatt og kann prógvast ella mótprógvast við eygleiðingum, royndum ella við øðrum kanningum | Tær áseta ella leggja dent á, hvussu eitthvørt fyribrigdi eigur at vera, t.d. ein ideologi<br><br>Normativar útsagnir verða undirbygdar við argumentatión.<br><br>Tað eru normar fyri sosialum atburði<br><br>Tað eru estetiskir normar, t.d. innan list<br><br>Tað eru normar fyri vísindi<br><br>Tað eru moralskir normar<br><br>Tað eru flokkingarnormar, t.d. innan fyri lívfrøði |

## Fylgiskjal nr. 6

### Induktivir, deduktivir og hypotetisk-deduktivur arbeiðshættir

Hvat er empirisk vísindi? Við støði í ítøkiligari vitan og nógvum royndum um eitt fyribrigdi er møguligt (verður roynt) at koma til eina endaliga niðurstøðu.

Hvat er induktión? Ástøðiligar kanningar við eygleiðingum, sum eru empiriskt tilfar, har roynt verður at koma til almennar niðurstøður. Frá empiri til teori. Frá tí einstaka til heildina.

Hvat er deduktión? Við støði í einum yvirskipaðari útsøgn (hypotesu) royna vit at gera nýggja vitan. Frá einum heildarsjónarmiði til einstøku lutirnar, gera vit niðurstøður. Frá heildini til tað einstaka. Frá teori til empiri.

Hvat er hypotetisk-deduktivur arbeiðsháttur ella modell? Ein vísindaligur arbeiðsháttur, har ein útsøgn (hypotesa), sum skal prógvast (verifiserast) ella mótprógvast (falsifiserast) við støði í einari útsøgn (hypotesu). Hetta verður gjørt við eksperimentum ella ”testum”, sum prógva ella mótprógva hypotesuna.

### Hvat kanna vit við induktión og deduktión?

| **Induktión:** | **Deduktión:** |
|---|---|
| Kanna smálutir: | Kanna heildina: |
| Observatiónir | Hypotesur |
| Eksperiment | Ástøði |
| Serdømi | Almennar lógir, t.d. tyngdarlógin |
| Dømi | |

### Hypotetiskur-deduktivur arbeiðsháttur

Empiri — Induktión: At finna mynstur, generaliseringar — Ástøði

Kvantativ data → Kategorisering: hugtøk

Kvalitativ data — Almennir samanhangir: ástøði

Prógva — Deduktión= logiskar niðurstøður

Mótprógva ← Hypotesur, sum eru operationellar

Testa

# Næmingar lesa minni enn nakrantíð

Tórður Johannesarson

**Í september í ár fór átakið "Føroyar lesa" av bakkastokki. Eitt átak, sum skal stimbra lesihugin hjá teimum ungu. Vit mugu vóna, at hetta átak er ein nýggj byrjan, har Mentamálaráðið sær álvaran í, hvussu týdningarmikið tað er at lesa. Fyrrverandi landsstýriskvinna, Hanna Jensen, setti sjøtul á.**

## Næmingar lesa ov lítið

Eg havi verið miðnámsskúlalærari í 17 ár, tað er ómetaliga stórur munur á, hvussu nógv næmingarnir lósu fyri 17 árum síðan og nú. Hví so er, er ilt at siga, møguliga hevur hetta okkurt við fólkaskúlan at gera ella føroyska nútíðarmentan? Teldur, teldlar og snartelefonir eru eisini komnar inn, og hetta hevur ikki bøtt um standin.

Í dag er tað vanligt, at næmingar siga, at teir aldri hava lisið eina føroyska skaldsøgu, tá ið teir koma á miðnám. Sjálvsagt gera hesir næmingar av, men tað boðar frá, at føroyskar skaldsøgur eru ikki frammarlaga í huga teirra ungu. Tá ið vit skulu lesa skaldsøgur saman við næmingunum, er fyrsti spurningurin, hvussu long søgan er; tað verður ikki spurt um innihald. Mínar royndir eru, at fáir næmingar kenna teir stóru føroysku høvundarnar, sum t.d. Heðin Brú, William Heinesen, Jóannes Nielsen og Jens Paula Heinesen. Í triðju sendingini "O móðurmál", sum varð send í 2016, sigur Hanus Kamban, at hann hevur illgruna um, at føroyingurin nú á døgum ikki lesur. Hetta kunnu miðnámsskúlalærarar vátta, ið undirvísa í máli og bókmentum. Ein av stóru avbjóðingunum hjá miðnámsskúlalærarum er at fáa næmingar at perspektivera. Sum eina síðusøgu kann eg nevna, at eg til eina próvtøku spurdi ein næming, um hann kendi til skaldskapin hjá Heðini Brú, hvat hann skrivaði um. Jú, hesin hevði lisið "The old man and his sons". Sum heild megna næmingar sera illa at lyfta seg upp frá tekstinum, tí at teir hava lisið so lítið. Teir hava einki at bera saman við, sjálvsagt eru undantøk, men sum heild er hetta galdandi. Onkuntíð kemur fyri, at brot í tekstum sipa til Bíbliuna, spyrt tú sum lærari um hetta, so er vitanin sera fátøk, eisini hjá næmingum, ið eru andaliga vaktir. Tað kundi verið áhugavert at gjørt kanning um lesivanar í hádeild og miðnámi.

## Breytaskipanin leggur ikki upp til lesing av stórum verkum

Í 2013 fingu vit nýggja breytaskipan, sum tíverri ikki er eftirmett av lærarum, tað er spell. Sum skilst, hevur onkur bólkur sitið við leiðslum og forfólki í lærararáðunum á miðnámi og eftirmett, men vanligi miðnámsskúlalærarin hevur ikki samskift um breytaskipanina. Ein slík eftirmeting hevði møguliga kunnað givið ráðnum ábending um støðuna. Men tað

er ikki ov seint, mítt tilmæli er, at vit øll á miðnámi sleppa at eftirmeta skipanina. Í sambandi við breytaskipanina fingu vit nýggja kunngerð fyri allar lærugreinir á miðnámi. Tann stóra kollveltingin var, at farið var frá pensummi til førleikar. Í nýggju kunngerðini stendur ikki greitt, hvat næmingurin skal læra, men hvørjar førleikar, ið hann skal ogna sær. T.d. hava vit lærarar í føroyskum roynt at tulka tekstin í kunngerðini, sum ynskir, at næmingurin skal hava førleikar til alt møguligt. Tað er tó eitt, sum stendur greitt í hesi kunngerð, tað er, at næmingurin skal duga skaldskap av mannamunni væl og virðiliga. Næmingurin skal lesa eina rúgvu av ymiskum tekstasløgum, men tað verður ikki nevnt ítøkiliga hvørji. Til dømis verður einki nevnt um skaldsøgur, yrkingasøvn ella bøkur um yrkistekstir. T.d. stimbra skaldsøgur og yrkingasøvn næmingin upp á allar mátar. Bøkurnar geva næmingum hugflog, mennir teir báði málsliga og mentanarliga. At fara frá pensumi til førleikar hevur fingið keðiligar málsligar avleiðingar og versnandi lesiførleikar. Vit á miðnámi varnaðust eisini, at okkurt broyttist í 2009, tá ið fólkaskúlin eisini fór frá pensumi til førleikamál. Vit eru onkursvegna noydd at hálsa um, vit eru noydd at stramma upp, soleiðis at vit koma á beint aftur.

## Hvørjar avleiðingar hevur breytaskipanin og sáttmálin frá 2013 havt?

Samstundis sum vit fingu nýggja breytaskipan á miðnámi, fingu vit nýggjan sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Yrkisfelagið Miðnám. Hesin sáttmálin var eisini ein kollvelting, sum gjørdi, at lærarar meira ella minni eru blivnir til tímaløntir, har alt gongur út upp á prógva og viga, hvat lærarin ger. Sáttmálin byggir á misálit og eina skipan, sum ger, at lærarin ger bara tað, sum hann fær løn fyri, alt annað verður ikki lønt. Tað er bara av góðum vilja, at lærarar lesa skaldsøgur við næmingunum. Skipanin er ómetaliga óliðilig og ómotiverandi. Sí grein í Miðnámsriti 14, 2017: Ársverkið køvir hugin.  Í dag brúka miðnámsskúlarnir stóra orku upp á akkordskipanina, fólk sita burtur av og ansa eftir, at alt fer rætt fram. Lærarar hava ynskt, at farið verður frá hesi skipan, men Fíggjarmálaráðið er ikki sinnað at ganga hesum ynski á møti.

Hvørjar avleiðingar hava so námsætlanirnar í føroyskum og sáttmálin frá 2013 havt fyri Føroyar? Hesar hava gjørt tað, at ein føroyskur miðnámsskúlanæmingur lesur munandi minni, enn hann gjørdi fyri 2013, bæði í lærugreinini føroyskum og øðrum lærugreinum. Fyrr las ein miðnámsskúlanæmingur 6 bøkur í føroyskum tey trý árini, hann gekk á miðnámi, nú kemur hann kanska upp á tvær ella tríggjar, tí at tíð er ikki til meir. Á HF las miðnámsskúlanæmingurin umframt tær seks bøkurnar 6 sjálvlisin verk, tá kundi hann bara í føroyskum koma upp á 12 bøkur upp í tvey ár, tá eru danskt, enskt, týskt og franskt ikki tikið við. Hetta er ein sera óheppin gongd. Fyri 2013 vóru skúlarnir við til at stuðla føroyskum bókum og rithøvundum, tí at miðnámsskúlanæmingar í túsundatali skuldu lesa

bøkur á móðurmálinum á hvørjum ári. Í dag er hesin marknaðurin næstan burtur. Vit sóu eisini í september, at ein av størstu prentsmiðjum landsins hevur undirskot.

## Føroyskar skúlabøkur – ein føroysk avbjóðing

Um vit venda okkum til skúlabøkur, so er sami standur. Tað er spell, at tað almenna ikki unnir okkara miðnámsskúlanæmingum lærubøkur á móðurmálinum. Fyri seks árum síðan gjørdu vit í Miðnámsriti eina kanning um føroyskt lærutilfar, hon vísti, at 80% er danskt tilfar, ongar ábendingar eru um, at talið er minkað hesi seks árini. Tað almenna gevur eisini miðnámsskúlanæmingum báði bókastuðul og lestrarstuðul, sum m.a. er ætlaður til bókakeyp, men í løtuni fer stórur partur av hesum pengum til donsk forløg sum Systime. Talan er um milliónir, ið føroyskir miðnámsskúlanæmingar stuðla donskum forløgum. Mentamálaráðið átti at sett í verk bókagerð í Føroyum, sum báði stuðlaði føroysku vinnuni og føroyskum lærarum, ið kundu gjørt lærutilfar til miðnámsskúlanæmingar. Á henda hátt verða pengarnir verandi í Føroyum.

Mentamálaráðið og politiski myndugleikin hevur seinastu árini bygt og umvælt bygningar fyri yvir eina milliard, men hava ikki viljað raðfest innihaldið á miðnámi, og avleiðingin er, at vit hava ein miðnámsskúla, har lesing á móðurmálinum ikki verður raðfest. Men kanska kann gongd koma á, nú Mentamálaráðið saman við øðrum ætlar, at næmingar skulu lesa meir.

Livst, so spyrst.

# Bókasavnið á Glasi

Tórður Johannesarson

**Føroya størsta skúlabókasavn er á Glasi. Umleið 26.000 bøkur og umleið 1.000 filmar eru til láns. Til bókasavnið eru avsettir 1.416 tímar um árið, ið eru javnt býttir millum starvsfólkini har. Miðnámsrit hevur tosað við tey trý: Onnu-May Djurhuus, Paulu Gaard og Sigurd Nordendahl.**

## Hvussu savnið verður brúkt

Bókasavnið verður nógv brúkt í sambandi við at skriva breytaruppgávur, breytarverkætlanir og tílíkt. Í hesum tíðarskeiðum hjálpa vit næmingum bæði við at finna hóskandi bøkur og við at leita á EBI (elektroniskar bókasavnstænastur á inerneti) eftir viðkomandi talgildum tilfari. Lærarar brúka bókasavnið meira javnt alt skúlaárið, tó brúka lærarar bókasavnið eitt sindur meira við ársbyrjan, tá undirvísingarætlanir verða gjørdar, og í próvtøkutíðini, tá próvtøkutilfar skal fyrireikast.

## Hvat kann mann læna á bókasavninum?

Bókasavnið hevur bøkur innan flest øll øki, sum almenn bókasøvn hava. Tað vil siga fagrar bókmentir og aðrar bókmentir innan flest øll øki í 10-talsskipanini hjá Landsbókasavninum. Tó kanst tú ikki læna til dømis kókibøkur, barnabøkur og heldur ikki so nógvar ungdómsbøkur, ið vit meta venda sær til ung undir 15-16 ára aldur. Orsøkin er, at hetta er eitt miðnámsskúlabókasavn, og tí leggja tey seg eftir at hava tað tilfar, ið tey meta vera viðkomandi fyri miðnámskúlanæmingar, næmingar á hægri námi og lærarar. Tær bókmentir, sum falla uttan fyri hetta øki, verða tí ikki raðfestar, men tær eru til taks á almennu bókasøvnunum so sum Býarbókasavninum og Landsbókasavninum. Á bókasavninum eru bæði spælifilmar og dokumentarfilmar. Bókasavnið á Glasi hevur filmar á teimum málum, ið undirvíst verður í á miðnámi (tó ikki latíni), og filmar, sum eru viðkomandi fyri søgulig, samfelagslig og landafrøðilig evni. Orsøkin er tann sama: vit hava filmar, sum eru viðkomandi at brúka í sambandi við undirvísing á miðnámi.

## Hvat læna næmingarnir og hvussu verður savnið brúkt?

Næmingar læna mest fagrar bókmentir og yrkisbøkur, ið eru viðkomandi í sambandi við uppgávuskriving og aðrar uppgávur, sum teir fáa í undirvísingarhøpi. Tá tað snýr seg um frítíðarlesnað, so læna næmingar mest føroyskar og enskar fagrar bókmentir.

Tað eru næmingar á bókasavninum so at siga hvønn skúladag – serliga í fyrsta og triðja fríkorteri. Umframt at læna bøkur og finna tilfar, brúka næmingar bókasavnið nógv til

bólkaarbeiði, og eisini sum eitt 'hvílistað' í millumblokkum ella fríkorterum, har tey bara sita og lesa ella slappa av fyri seg sjálv.

Fysiskar bøkur hava týdning fyri nógv fólk. Nógv menniskju minnast betur, hvat tey hava lisið, tá ið tey minnast, hvar á einari bókarsíðu okkurt stóð - vinstru ella høgru megin, niðast, ovast ella mitt á síðuni.

Fysisk bókasøvn hava eisini týdning. Tey eru støð, har tú fysiskt ert, meðan tú lesur, ella ert fyri at skaffa tær lesnað. Tað er ikki líkamikið, hvat tað er fyri eitt stað, tú vitjar. Bókasavnið er eitt stað, har bøkur standa, og har fólk eru, sum eru áhugað í bókum. Tey, sum sita har, eru har av somu orsøk sum tú: fyri at læna bøkur ella lesa bøkur og arbeiða við evnum, sum krevja djúphugsni, og har tað er møguleiki fyri at finna tilfar um evnini. Bókasavnið er ein informatiónsdepil, og tað ávirkar huglagið inni har. Á bókasavninum verða spurningar reistir, sum kanska ikki verða settir aðrastaðni, og meðan tú leitar eftir einari bók, kemur tú fram á aðrar, og víðkar soleiðis tína vitan um ymisk evni uttan at gáa um tað. Bara tað, at bøkur standa frammi, skapar forvitni og grundarlag undir kjaki um bøkur og skúlaskap.

Bókasavnið verður nógv brúkt í gerandisdegnum. Næmingar leita sær oman hagar at arbeiða og sita í friði og náðum og lesa. Fyri fleiri er tað ein frístaður, har tey kunnu koma og hvíla seg og kenna seg trygg. Tað eru nógv, sum uppliva, at bygningurin er so opin og gjøgnumskygdur, og tað kennist trygt at koma oman á bókasavnið at slappa av og gera okkurt arbeiði.

Bókasavnið verður eisini nýtt til at hava ymisk tiltøk. Vit hava havt upplestur har og rithøvundarvitjanir. Skúlaárið 2019-2020 hava vit havt eitt afturvendandi tiltak á bókasavninum, sum vit hava kallað “Bókin henda mánaðin”, har næmingar hava meldað seg til at ummæla/viðmæla bøkur, sum teimum dámar at lesa. Hetta hevur gingið fyri seg á tann hátt, at tey sjálv hava sett seg í samband við bókavørðin og bjóðað seg fram. Vit hava so sett tveir næmingar á skrá hvørja ferð. Næmingarnir seta sjálvir treytirnar og gera av, hvat og hvussu tey leggja fram. Onkuntíð hevur tað verið eitt sindur formelt, aðrar ferðir hava vit sitið um eitt borð og prátað um bøkurnar. Hetta hevur typiskt verið, tá onkur bók er løgd fram, sum fleiri hava lisið. Tað koma eini 10-15 fólk til eitt slíkt tiltak, og tað er ófør t. Tað er ikki altíð stór mongd av fólki, sum skal til, at eitt tiltak er væleydnað. Tað, at eitt tiltak er fyri tey, sum elska bøkur - sum elska at lesa og fegin vilja seta tíð av til at leggja fram, hóast tey hvørki fáa karakter ella grønan blokk fyri tað - er endamál í sjálvum sær. Tað er lesigleðin, sum verður sett fremst á hesum tiltaki. Tiltakið stuðlar eisini upp undir eitt av endamálunum við bókasavninum: at vita, hvat næmingarnir tíma at lesa og at bíleggja bøkur, sum vit vita, at teimum dámar. Vit hava tí bílagt allar tær bøkurnar, sum næmingarnir leggja fram, og endamálið er at hava eitt bókasavn, sum ikki bara er eitt út-

búgvingarbókasavn, sum vegleiðir næmingar í uppgávum, sum hava við sjálvt curriculum at gera, men eisini eitt, sum stimbrar lesigleðina hjá okkara næmingum og leggur upp til ekstracurrikulert virksemi. Tá hugsað verður um, hvussu nógv orka fer á skúlunum til at stimbra lesiveik, hevur bókasavnið eina natúrliga uppgávu her at birta upp undir lesigleðina, sum er drívmegin aftan fyri alla lestrarmenning.

Bókasavnið verður eisini nýtt til at hava smáar fundir, til dømis tá ið breytaverkætlanir eru, og næmingurin skal hava fund við vegleiðarar. Tað er upplagt at hittast har, sum tilfarið til uppgávurnar er at finna.

## Avbjóðingin hjá einum skúlabókasavni nú á døgum

Hugsa vit um bókasøvn yvirhøvur, er ein av teimum stóru avbjóðingunum hjá teimum at flyta seg inn í ta nýggju tíðina, har talgildir miðlar eru ein stórur partur av tí, sum fólk læna og lesa. Kortini eru fysiskar bøkur týdningarmiklar og neyðugar, og tað snýr seg um at finna javnvág millum savnið av fysiskum bókum og talgildum miðlum. Stóra nøgdin av talgildum tilfari ger, at bókasøvn kenna seg noydd til at gera ymisk átøk fyri yvirhøvur at fáa fólk at koma á bókasavnið, og tað er ymiskt, hvussu nógv bókasøvnini gera burturúr. Tað er vanligt, at bókasøvn í dag hava rithøvundarvitjanir, framførslur og framsýningar av ymiskum slag fyri at fáa fólk at vitja søvnini. Skúlabókasøvnini hava fyri ein part somu avbjóðing, og tað ljóðar kanska undarligt, men ein av stóru avbjóðingunum hjá skúlabókasøvnunum í dag er at fáa skúlaleiðslurnar og politiska myndugleikan at síggja týdningin og virðið í einum skúlabókasavni. At fáa myndugleikarnar at skilja, at tørvur er á bæði at halda tað fysiska savnið av bókum við líka og at menna førleikar hjá starvsfólkinum á bókasavninum at vegleiða næmingum í at nýta teir talgildu miðlarnar.

Tað skal bera til at hugsavna seg á einum bókasavni, men bókasavnið skal eisini vera innbjóðandi. Bókasavnið á Glasi er innrættað soleiðis, at tað eru møguleikar hjá næmingum at seta seg inn har at arbeiða í bólkum. Tað skal vera lív í, men ikki so nógv lív, at tað órógvar onnur. Tað snýr seg um at finna ta góðu javnvágina.

# Skúlanet – ein KT-loysn?

Tórður Johannesarson

**Í september í ár handaði ein bólkur landsstýrismanninum í skúlamálum eina KT-loysn fyri skúlaverkið. Ein áhugaverd frágreiðing, ið hevur batar, sum eisini kann hava nakrar vansar. Ein av hesum vansum er, at menningin av KT innan skúlaverkið steðgar upp, tí at øll bíða eftir 2024. Eisini kunnu skúlarnir verða til mjólkineyt hjá privatu vinnuni.**

## Ein felags skrásetingarskipan

Ein av grundgevingunum fyri at fáa eina felags KT-loysn er, at forkanningar hava staðfest, at eingin av verandi KT-skipanum lýkur krøvini til KT-trygd og verju av viðkvomum persónsupplýsingum. Fleiri KT-skipanir krevja longu nú dagføringar, sum hvør sær eru kostnaðarmiklar. Landsgrannskoðarin og Dátueftirlitið hava víst á álvarsligar veikleikar við trygdini í verandi skipanum. Skúlaleiðslur, myndugleikar og politiska skipanin fáa ikki álítandi hagtøl, ið eru ein fyritreyt fyri umsiting, planlegging og menning. Staðfest er ein víðfevnd dupultskráseting og manuell deiling av upplýsingum, sum elva til feilir í málsviðgerð og høpisleyst orkuspill hjá myndugleikum, lærarum, næmingum og foreldrum.

Ein fyrimunur við at fáa eina felags KT-loysn er, at allir skúlar fáa somu skrásetingarskipan, har møguleiki er at skráseta fráveru, innlatingar, undirvísingarfrágreiðingar og annað. Í løtuni hava miðnámsskúlarnir ikki eina slíka, men hava ymiskar skipanir, báði føroyskar og útlendskar. Á Glasi er ein sera góð skrásetingarskipan, ið hevur heitið Tímaglasið, ið er ment av tveimum lærarum. Ein sera greið og fleksibul skipan, sum starvsfólk og næmingar eru glað fyri. Helst kunnu ábøtur og annað gerast.

## Hvat er Skúlanet?

Í frágreiðingini stendur m.a.: "Stovnað verður Skúlanet, sum er ein felags rakstrar- og supportorganisatión, ið mennir og rekur eitt vælvirkandi  og trygt KT-net fyri alt undirvísingarverkið, ið svarar til tað, sum Landsnet er fyri landsstovnarnar. Skúlanet er ein KT felagskapur millum Undirvísingarstýrið, Nám, kommunurnar, fólkaskúlan, miðnám, Setrið og KT landsins. Størsti parturin av uppgávunum verða útveittar til føroysku KT-vinnuna."

Sambært frágreiðingini er ikki heilt greitt, hvussu Skúlanet skal skipast. Men vit kunnu ímynda okkum, at tað verður ein stovnur við stjóra, deildarleiðarum, skrivstovufólkum og KT-fólkum. Tað vil siga, at vit fáa ein nýggjan stovn; frágreiðingin sigur ikki, hvørt hesi fólk verða lønt av tí almenna ella tí privata, men mest sannlíkt er, at tað verður ein al-

mennur stovnur, sum so fær inntøkur, hvørja ferð KT-fólk, sum arbeiða fyri Skúlanet, koma út á skúlarnar at hjálpa, vegleiða og umvæla. Hetta verður neyvan bíligt, tí at veita KT-tænastur er ómetaliga dýrt. Helst verður tað soleiðis, at Skúlanet veitir eitt gjald fyri hvørja vitjan umframt rokning fyri umvælingar o.a. Á henda hátt fara privatir veitarar at senda tí almenna rokningar.

Í frágreiðingini stendur, at Skúlanet veitir KT-trygd, KT-innkeyp, KT-rakstur og KT-support til allar stovnar í undirvísingarverkinum. KT-support fæst alt samdøgrið, so brúkararnir kunnu fáa loyst átrokandi spurningar, eisini uttan fyri vanliga arbeiðstíð. Hetta ljóðar fínt, men hvat siga KT-fyritøkurnar í Føroyum, sum ikki eru kappingarførar, tá ið Skúlanet fer at keypa 1.000 teldur um árið frá einari úrvaldari fyritøku, sum kann bjóða Skúlaneti bíligastu teldur?

Víðari í frágreiðingini stendur, at KT-serfrøðingar koma á staðið at seta hardware upp og læra fólk á staðnum upp. Tað merkir, at nógvar tøkniligar uppgávur verða fluttar frá skúlunum til Skúlanet. Sostatt ber til hjá KT-starvsfólkum at savna seg um KT-didaktiska ráðgeving, og hjá skúlunum at savna seg um skúlaskap og ikki KT-spurningar. Hetta er nokk so løgin grundgeving, sum svarar til, at aðrar tænastur verða veittar út úr húsinum, til dømis umsiting, fíggjardeild, húsatænarar, vaskifólk o.s.fr. Hví verður KT-tænastan á staðnum tikin burturúr – og ikki hinar?

Vit vita, at KT kann vera svikalig. Á einum skúla eru hvønn dag tøkniligar avbjóðingar, sum næmingar og lærarar hava. Tað er skjótt og einfalt at seta seg í samband við fólk, ið vara av KT á staðnum. Eg sum lærari ræðist tankan um, at tá ið næmingar og lærarar hava tøkniligar trupulleikar, koma vit á ein langan bíðilista á Skúlaneti, sum kemur út á skúlarnar, tá ið tey hava tíð. Stórur vandi er eisini fyri, at tað, sum skúlarnir hava bygt upp hesi seinastu árini, verður ikki hildið við líka og ment, tí at framtíðin er so óviss.

Í dag virkar KT á miðnámi væl. Lærarar og næmingar fáa skjóta og góða tænastu frá KT-fólki. Eisini er stutt millum brúkarar og KT-fólk. Vit kunnu vænta, at øll forritan og menning á skúlunum á KT-økinum fara at verða merkt av støðuni, tí at øll fara at bíða eftir Skúlaneti og 2024. Alt hetta kann koma at ganga út yvir næmingar og lærarar, og tí mugu leiðslur ansa væl eftir, at tað ikki hendir.

Nú skal frágreiðingin gjøgnum politisku skipanina; bólkurin, ið hevur skrivað frágreiðingina, væntar, at tað fer at kosta 40 milliónir at fremja hesa ætlan, sum skal vera liðug í 2024. Sambært fíggjarlógaruppskotinum fyri 2021 eru tríggjar milliónir settar av, og bólkurin, sum handaði landsstýrismanninum álitið, mælir til 10 milliónir um árið. Tað kunnu vit so tulka sum, at 2024 neyvan verður árið, tá ið Skúlanet er komið upp at koyra.

## Sum heild

Við Skúlaneti er vandi fyri, at vit fara at merkja eina fremmandagerð; royndir hava víst, at hesin vandin er til staðar. Vit kunnu vænta, at hesin felagsskapur ella stovnur fer at verða sera dýrur at reka, og vandi er fyri, at næmingar og lærarar fara at fáa eina verri tænastu, enn teir fáa í dag.

## Kelda

Saman um eina trygga heildarloysn heildarætlan fyri undirvísingarverkið 2021-2024, september 2020.

# FabLab á Kambsdali

Jóannes Djurhuus

**FabLab kemur av ensku orðunum Fabrication Laboratory ella framleiðslu-verkstova. FabLab hevur røtur í Center for Bits and Atoms á MIT-universitetinum í Massachusetts í USA. Tað var leiðarin har, Neil Gershenfeld, sum, umframt at granska í evninum, eisini skapti fakið "How to Make (Almost) Anything" á MIT, ið síðani leiddi til FabLab-hugskotið.**

FabLab er ein verkstova við tøkni og tólum til at gera næstan hvat sum helst. FabLab gevur ungum sum eldri, einstaklingum eins og fyritøkum møguleika at brúka skapanarevnini og fullføra hugskot við at sniðgeva, seta saman og framleiða við hjálp av talgildari tøkni. FabLab stuðlar undir framleiðslu í smáum nøgdum, við denti løgdum á arbeiði við prototypum. Á FabLab er stutt ímillum hugskot og prototypu.

FabLab á Kambsdali var fyrsta FabLab í Føroyum. Tað var leiðslan á Miðnámi á Kambsdali, sum loftaði hugskotinum, ið NORA (Nordisk Atlantsamarbejde) bar fram í Føroyum. Við góðum stuðli frá privatum, kommunum og frá landinum, varð farið í gongd á sumri 2017. Tól vórðu keypt inn, høli fingin til vega á skúlanum, og í 2018 varð FabLab latið upp alment.

Síðan FabLab á Kambsdali kom, er eitt annað FabLab komið, sum heldur til í Vági. Tey føroysku FabLab'ini eru knýtt í eitt netverk, sum røkkur út til fleiri enn 100 lond. Í dag eru umleið 1800 Fab Lab-verkstovur knýttar í netverkið. Sera tætt samarbeiði er millum tey norðurlendsku FabLab'ini, sum øll eru limir í felagnum Norðurlendsk FabLabs.

Einaferð um árið møtast fólk úr Norðurlondum á einum "bootcamp", har egnar royndir verða deildar, har kann man læra rættiliga nógv. Í 2019 var ein tílíkur Bootcamp hildin á Miðnámi á Kambsdali við luttakarum úr hinum Norðurlondunum. Á hesum Bootcamp varð eitt norðurlendskt Fab Lab-felag sett á stovn.

## Hvør brúkar FabLab á Kambsdali?

Fab Lab á Kambsdali heldur til á Miðnámi á Kambsdali. FabLab í Vági heldur til í niðastu hædd í vestara enda í Vágs skúla.

FabLab á Kambsdali hevur opið allar dagar í skúlatíð fyri næmingar á miðnámi. Opið er fyri almenninginum mánadag og mikudag kl. 13-16 og hósdag kl. 9-19:30, og onnur tíð kann avtalast, um tørvur er á tí. Vanliga støkka næmingar inn á gólvið av sínum eintingum; tó um talan er um eina ávísa verkætlan, har FabLab er ein natúrligur partur,

verður vitjanin á FabLab gjørd í samráði við læraran; hetta sama er galdandi fyri flokkar í fólkaskúlanum.

FabLab á Kambsdali verður nógv brúkt av serbreytini, sum er ætlað teimum, ið eru tarnað at gjøgnumføra miðnám undir vanligum treytum. Tað er ymiskt, hvussu næmingar á serbreytini eru fyri at brúka FabLab. Har eru næmingar, sum eru á byrjanarstigi, tá ið tað kemur til tól og teldur, men tað eru eisini næmingar, sum eru á rættiliga høgum stigi innan økið. Innovatión er ein lærugrein, sum nýtir FabLab nógv. Tað eru ikki bara næmingar á miðnámi, ið brúka FabLab, men eisini fólkaskúlanæmingar, sum framleiða lutir, sum teir longu hava lagt til rættis og teknað á skúlanum, áðrenn teir koma á verkstovuna.

Vanliga verður rindað fyri tað tilfarið, sum verður nýtt. Er talan um størri uppgávur, verður avtala gjørd um nýtslu av tólum. Væntað verður, at brúkarin arbeiðir við tólunum sjálvur, men kann altíð fáa vegleiðing.

Av tólum, sum kunnu nýtast á FabLab, eru t.d. 3D-printarar, smáir og stórir CNC-fresarar, vinyl-skerari, broderímaskina, stórmynda-prentari og lasara-skerari. Tólini verða øll stýrd av teldum, og tey, sum brúka FabLab, verða lærd at nýta tólini eftir tørvi. Nakrar teldur eru tøkar á FabLab, men brúkarar kunnu eisini nýta egna teldu til t.d. tekningar.

Tað er rættiliga ymiskt, hvussu nógv FabLab verður nýtt. Fyri jól er sera rokaligt allar dagar. Hósdagar er opið til 19:30; tó ofta verður tað seint, áðrenn ljósið verður sløkt. Men í januar kemur bert hendinga fólk á gátt. Í miðal vitja umleið 40 fólk FabLab á Kambsdali um vikuna. Tað er sera ymiskt, hvussu drúgva tíð tey nýta – líka frá 10 minuttum til tríggjar dagar. Okkurt arbeiði verður gjørt eftir bílegging. Hetta verður gjørt, tá mett verður, at tað er tann skjótasta loysnin fyri allar partar.

## Dømi um, hvat verður gjørt á FabLab:

- Brodering av tekstum, mynstrum og myndum.
- Printing av 3-dimensjonellum lutum.
- Brenna myndir á træ ella glas.
- Fínskera tunt træ ella plexiglas.
- Fresa (skera) lutir úr træi, t.d. úr heilum bygningsplátum ella fínum træsløgum.
- Tekna, framleiða og lodda printplátur.
- Skera vinyltekningar, sum kunnu klistrast uppá ymiskt.
- Gera T-shirts við einkultum tekningum.
- Prenta stórar plakatir ella klædnamodell.

## Námsfrøðiligur vinningur

Í FabLab er tað stutt millum hugskot og úrslit; her verður hugsað um myndir, lutir, tekstil og elektronikk, bæði til prýðis og til gagns. At síggja ítøkiligt úrslit av egnum hugskotum kann stuðla undir førleikan innan fakøkið hjá næmingum, ið eru visuellir.

Tá brúkarin eftir so stuttari tíð kann síggja eitt ítøkiligt úrslit av sínum hugskoti, byrjar sum oftast eitt samanspæl millum hugskot og úrslit. Brúkarin fær eina væl betri fatan av egnum hugskoti. Hugskotið kann búnast til eitt meira endaligt og nýtiligt úrslit, tó kann tað staðfestast, at hetta var ikki nakað at fara víðari við; og tað er heldur ikki ein skeiv niðurstøða at koma til. Tað er týdningarmikið, at brúkarin sær, hvørjir møguleikar eru á FabLab og kann nýta henda háttin at hugsa og arbeiða uppá framyvir í komandi hugskotum og tilgongdum.

# Persónupplýsingar og dátuvernd – ein innleiðsla til dátuverndarrættin

John Nolsøe Olsen

## Dátuvernd í samfelagnum

Øll hava eina fatan av, at summar upplýsingar eru privatar, meðan aðrar kunnu nógv ella øll fáa atgongd til. Her verður skilt í millum alment og privat. Tað kann vera trupult at gera av, hvussu hesi bæði skulu skiljast at, tí vit hava ymiska fatan, og mørkini flyta seg við samfelagsligu og tøkniligu menningini. Modernaða kunningartøknin hevur skert ta privatu sferuna, har møguleiki er fyri at hava eftirlit og halda eyga við borgaranum. Privatlívið er hótt á sama hátt sum umhvørvið.[i] Charles Jennings lýsir hetta væl:

> *Privacy is a lot like clean air. There was plenty of both once, but technology has made each considerably less plentiful.*[ii]

Dátuverndarrætturin ella persónupplýsingarrætturin inniheldur rættarligar reglur um persónupplýsing við atliti at privatlívi. Í Føroyum hevur persónupplýsingarlógin[iii] reguleráð hetta økið síðani 1. januar 2002.

Tað eru ymiskar hugsanir um, hvat dátuvernd er. Sambært ognarhugtakinum "eigur" einstaklingurin upplýsingar um seg sjálvan. Hetta sjónarmið hevur tó ikki vunnið serligan frama í Evropa, har siðvenjan hevur lagt dent á ræðisrættin á persónupplýsingum. Í GDPR (General Data Protection Regulation)[iv], præambel nr. 2, stendur:

> *Principperne og reglerne for beskyttelse af fysiske personer i forbindelse med behandling af deres personoplysninger bør, uanset deres nationalitet eller bopæl, respektere deres grundlæggende rettigheder og frihedsrettigheder, navnlig deres ret til beskyttelse af personoplysninger.*

Dátuvernd snýr seg um menniskju og upplýsingar um tey. Í Føroyum er sama siðvenja, sum sæst í verandi persónupplýsingarlóg, sum sigur, at lógin hevur til endamáls, at

> *tryggja persónsvernd hins einstaka, tá persónupplýsingar verða viðgjørdar, soleiðis at persónupplýsingar verða viðgjørdar við virðing fyri tí persónliga frælsinum og heimafriðinum og grundað á persónupplýsingar við høgari góðsku.*[v]

Dátuverndarrætturin hevur til endamáls at verja upplýsingar um ein og hvønn likamligan persón. Einstaklingurin – persónurin – er í miðdeplinum.[vi] Hesin likamligi persónurin verður nevndur "tann skrásetti". Endamálið við dátuverndini er at forða fyri, at persón-

upplýsingar verða misnýttar. Tann skrásetti kann vera ein næmingur, sum skúlin viðger upplýsingar um, ella ein umsøkjari til starv, sum ein stjóri viðger umsóknina hjá.

Dátuvernd hongur saman við rættinum til privatlív, sum vit kenna frá § 72 í grundlógini, sum ásetir, at bústaðurin er friðhalgaður, og at húsarannsókn (t.e. at leggja hald á ognir, kanna brøv og onnur pappír, bróta post-, telegraf- og telefonloyndarmál) bert kann fara fram sambært dómi. Rætturin til privatlív víkir bert fyri dómi ella serstøkum lógligum undantaki.

The European Convention on Human Rights, Article 8, sum eitur “Right to respect for private and family life, home and correspondence”, sum hevur privatlív í fokus, nevnir nágreiniliga “data protection”. Ofta verður tosað um *data protection* og *right to privacy* sum tað sama, tí í okkara modernaða samfelagi hanga hesi hugtøk nú óloysiliga saman.

Tann 4. juni 2020 samtykti løgtingið uppskot um lóg um vernd av persónupplýsingum, nevnd “dátuverndarlógin”, sum kemur í gildi 1. januar 2021 í staðin fyri verandi persónupplýsingarlóg. Dátuverndarlógin er eitt tillagað avrit av GDPR (General Data Protection Regulation), sum er ein evropeisk fyriskipan (forordning), sum kom í gildi í ES, 25. mai 2018. Dátuverndarlógin skal regulera hetta økið í Føroyum.[vii]

Henda grein er ætlað sum innleiðsla til dátuverndarrættin og komandi dátuverndarlóg, men er avmarkað til ávís grundhugtøk og dømi, sum eru ætlað at geva lesaranum eina praktiska fatan av grundhugtøkunum innan dátuverndarrættin.

## Dátuábyrgdari og dátuviðgeri

Ein dátuábyrgdari kann vera ein likamligur ella løgfrøðiligur persónur (t.d. partafelag), ein almennur myndugleiki, ein stovnur ella ein onnur eind, sum eina ella saman við øðrum ger av, til hvørji endamál og við hvørjum hjálpitólum persónupplýsingar kunnu viðgerast. Dátuábyrgdarin er tann, sum hevur ábyrgdina av viðgerðini, sum ræður yvir persónupplýsingunum, og sum ger av, hvussu hesar skulu viðgerast. Dátuábyrgdarin hevur eisini ábyrgdina av at viðgera persónupplýsingar á rættan og tryggan hátt.

Ein dátuviðgeri er ein likamligur ella løgfrøðiligur persónur, ein almennur myndugleiki, ein stovnur ella ein onnur eind, sum viðger persónupplýsingar vegna dátuábyrgdaran. Ein dátuviðgeri viðger ikki persónupplýsingarnar egna vegna og til egið endamál, men fyri dátuábyrgdaran, sum eisini hevur ábyrgdina mótvegis tí skrásetta. Tað kann vera ein, sum veitir servarar til ein skúla, og sum vegna skúlan goymir persónupplýsingar. Veitarin hevur ikki eitt sjálvstøðugt endamál at goyma upplýsingarnar, men ger tað vegna skúlan.

## Hvat eru persónupplýsingar?

Ein og hvør upplýsing og meting, sum kann verða knýtt at einum ávísum likamligum persóni, er persónupplýsing, eisini um hetta er treytað av kunnleika um p-tal, nummarplátu, teldupost ella tílíkt. Upplýsingar í eini mynd ella einum fingramerki eru eisini persónupplýsingar.

Hóast ein upplýsing er bronglað (krypterað), er hon framvegis ein persónupplýsing, um kodan (krypteraða endaúrslitið) kann føra aftur til upprunaligu persónupplýsingingarnar. Upplýsingar, sum eru bronglaðar, eru persónupplýsingar, um onkur hevur lykilin til at týða bronglingina og soleiðis eyðmerkja persónar, sum annars vóru fjaldir av bronglingini.

Um ein persónupplýsing er pseudonymiserað, er hon framvegis ein persónupplýsing eftir lógini, tí har finst ein lykil, sum kann týða bronglaðu koduna. Um ein persónupplýsing er anonymiserað, finst eingin koda at týða koduna, og tá dettur persónupplýsingin út um lógina. Tó er pseudonymisering vanliga eitt gagnligt amboð fyri at tryggja trygd og trúnað.

Dátuverndarlógin skilir í millum viðkvæmar og vanligar persónupplýsingar. Vanligar persónupplýsingar eru:

- Navn
- Bústaður
- Telefonnummar
- Teldupostur
- P-tal (kann bert vera uppi í viðgerð, um serligar treytir eru loknar)
- Ein mynd (um persónur kennist aftur í myndini)
- Ljóðupptøka (hóast eingi nøvn eru nevnd í upptøkuni)
- Biometri (so sum: fingramerki, lithinnumynstur og andlitsafturkenning)
- Dynamiskar IP-adressur[viii]
- Nummarpláta á bili
- Upplýsingar um atferðarmynstur (hvat og hvar tú keypir, hvørjum sjónvarpsrøðum tú hyggur at, hvar tú fysiskt ferðast, og hvørjum tú leitar eftir á netinum)
- Samansettar upplýsingar, sum til samans eyðmerkja ein ávísan persón

Viðkvæmar upplýsingar eru:

- Húðarlitur
- Ættarslag ella etniskur uppruni
- Politisk sannføring
- Átrúnaðarlig sannføring
- Heimspekilig sannføring

- Yrkisfelagsligt tilknýti
- Ílegudátur
- Biometriskar dátur við tí endamáli eintýtt at eyðmerkja ein persón
- Heilsuupplýsingar
- Upplýsingar um kynslig viðurskifti
- Revsiverd viðurskifti
- Upplýsingar um munandi sosialar trupulleikar
- Onnur heilt privat viðurskifti

Bæði tá ið vanligar persónupplýsingar og viðkvæmar persónupplýsingar verða viðgjørdar, skulu meginreglur og viðgerðarreglur í lógini um heimild, trygd og trúnað fylgjast. Tó eru viðgerðarreglurnar viðvíkjandi viðkvæmum persónupplýsingum strangari.

## Hvat fevnir "viðgerð" av persónupplýsingum um?

Viðgerð skal skiljast breitt. Øll nýtsla, so sum at savna, skráseta, samkoyra, goyma, geva víðari, avhenda ella sameina hetta, um hon er automatisk ella ei, er viðgerð. Automatisk viðgerð er at skilja sum elektronisk viðgerð. Hetta fevnir um eina og hvørja viðgerð av persónupplýsingum, t.e. ein og hvønn aktivitet, við ella uttan automatiska viðgerð, har persónupplýsingar verða savnaðar, skrásettar, skipaðar, samskipaðar, goymdar, tillagaðar, broyttar, endurfunnar, gjøgnumleitaðar, nýttar, latnar víðari, útbreiddar ella á annan hátt gjørdar tøkar, samanbornar ella samankoyrdar, avmarkaðar, strikaðar ella fyribeindar.[ix]

## Nær kunnu persónupplýsingar viðgerast?

Dátuverndarlógin ásetir seks meginreglur, sum altíð skulu fylgjast, tá ið viðgerð fer fram:

1. Lógligheit, rímiligheit og gjøgnumskygni
2. Endamálsavmarking
3. Dátuavmarking
4. Rættleiki
5. Goymsluavmarking
6. Sjálvræðisrættur (integritetur) og trúnaður

Ein sjeynda meginregla er um ábyrgd, sum skal hugsast inn í hinar seks meginreglurnar.

## Lógligheit

Ein og hvør viðgerð av persónupplýsingum skal vera lóglig. Ein dátuábyrgdari skal hava heimild í dátuverndarlógini til at viðgera persónligar upplýsingar hjá kundum og borgarum, t.d. við at útvega sær samtykki frá kundunum.

## Rímiligheit

Viðgerð av persónupplýsingum hava atlit at áhugamálum og rímiligari væntan hjá teimum skrásettu, og hon skal vera gjøgnumskygd og skillig. Hon skal ikki vera loyndarfull ella villleiðandi. Upplýsingar skulu viðgerast trygt og við góðum dátuviðgerðarsiði.

## Gjøgnumskygni

Viðgerð av persónupplýsingum skal vera greið. Tann skrásetti, sum persónupplýsingarnar eru um, skal kunnast um viðgerðina. Gjøgnumskygni skapar álit og kunnar skrásetta um rættindi, hann hevur. Hervið kann skrásetti varða um síni áhugamál.

Dátuábyrgdarar skulu geva viðskiftafólki sínum gjøgnumskygda kunning um, hvussu fyritøkan viðger persónligar upplýsingar. Hetta skal gerast í einum greiðum og týðiligum málburði, sum er orðaður til málbólkin.

## Endamálsavmarking

Persónupplýsingar skulu bara viðgerast í samband við nágreinilig, tilskilað og lóglig endamál. Endamálið skal sostatt avmarkast. Hvørt endamál í sambandi við at viðgera persónupplýsingar skal eyðmerkjast og lýsast. Øll endamál skulu verða lýst soleiðis, at allir persónar, sum viðgerðin er um, hava somu fatan av, hvat persónupplýsingarnar skulu brúkast til. At endamálið skal vera lógligt, merkir, at tað, umframt at hava heimild, eisini skal vera í samsvari við aðrar etiskar og rættarligar reglur.

Persónupplýsingar kunnu ikki endurnýtast til onnur endamál enn upprunaliga endamálið. Endurnýtsla av persónupplýsingum at goyma í savni, sum hevur almennan áhuga, vísindalig ella søgulig granskingarendamál ella hagfrøðilig endamál, stríðir ikki ímóti upprunaligum viðgerðarendamáli, um viðgerðin hevur sett hóskandi trygdartiltøk í verk.

## Dátuavmarking

Meginreglan um dátuavmarking merkir, at mongdin av innsavnaðum persónupplýsingum skal avmarkast til tað, sum er neyðugt fyri at lúka endamálið við innsavningini. Um samleikaupplýsingar ella persónupplýsingar ikki eru neyðugar til endamálið, talar meginreglan um dátuavmarking fyri, at hesar upplýsingar ikki verða innsavnaðar.

## Rættleiki

Persónupplýsingar, sum verða viðgjørdar, skulu vera rættar. Upplýsingarnar skulu eisini dagførast, um tað er neyðugt. Hetta merkir, at dátuábyrgdarin hevur ábyrgd av beinanvegin at strika ella dagføra persónupplýsingar, sum eru skeivar, í samband við tey endamál, sum upplýsingarnar verða viðgjørdar.

## Goymsluavmarking

Meginreglan um goymsluavmarking er, at persónupplýsingar skulu goymast soleiðis, at tær verða strikaðar ella anonymiseraðar, tá ið tær ikki longur eru neyðugar til tað endamálið, sum tær vórðu innsavnaðar til.

## Sjálvræðisrættur og trúnaður

Persónupplýsingar skulu viðgerast á slíkan hátt, at sjálvræðisrætturin og trúnaðurin, ið er tengdur at upplýsingunum, verða vardir.

## Ábyrgd

Meginreglan um ábyrgd undirstrikar ábyrgdina hjá dátuviðgeranum at bera seg at í samsvar við reglurnar um viðgerð av persónupplýsingum og at virka eftir góðum dátuviðgerðarsiði. Dátuviðgerin má vera forvirkin og seta øll neyðug fyriskipanarlig og tøknilig tiltøk í gildi fyri at tryggja, at gjørt verður eftir regluverkinum.

Dátuábyrgdarin skal kunna prógva, at gjørt verður eftir dátuverndarlógini. Dátuábyrgdarin eigur sostatt at kunna skjalprógva sínar gerðir fyri at prógva, at viðkomandi ger eftir meginreglunum í dátuverndarlógini. Hetta er eitt umfatandi krav, og má havast í huga, tá ið ræður um áður nevndu meginreglur.

## Viðgerðarheimild

Umframt meginreglurnar er treyt, at viðgerð í hvørjum einstøkum føri hevur heimildargrundarlag, t.e. eitt lógligt grundarlag undir viðgerðini. Hetta verður nevnt viðgerðarheimild og er galdandi fyri viðgerð av vanligum og viðkvæmum upplýsingum. Hetta kann vera samtykki frá tí skrásetta ella heimild í lóg. Samtykki kann vera viðkomandi í eini verkætlan, har samrøður um heilsustøðu skulu gerast við heimildarfólk. Avtalur kunnu eisini vera heimildargrundarlag, t.d. um tú keypir eina vøru, og veitarin má hava tínar kontaktupplýsingar og bústað, um hann skal veita tær vøruna.

Dátuviðgerin hevur skyldu at upplýsa skrásetta um, hvørjum grundarlagi, t.e. við hvørji viðgerðarheimild teirra persónlýsingar verða viðgjørdar á.

Dømi um viðgerðargrundarlag:

- Samtykki
- Neyðugt fyri at halda eina avtalu
- Neyðugt fyri at lúka eina rættarliga skyldu
- Neyðugt fyri at verja lívsneyðug endamál
- Neyðugt fyri at greiða eina uppgávu, sum hevur almennan áhuga
- Neyðugt fyri at røkja heimilað áhugamál
- Rættindi hjá tí skrásetta

Tann skrásetti hevur rættindi móti dátuábyrgdaranum. Tað eru rættindi hjá tí skrásetta, sum skulu verjast, og dátuábyrgdarin skal virða hesi rættindi. Endamálið við rættindunum er at skapa gjøgnumskygni fyri skrásetta um, nær persónupplýsingar verða viðgjørdar, og hvørjar upplýsingar verða viðgjørdar. Harumframt geva rættindini tí skrásetta ræði yvir egnum persónupplýsingum.

Dátuverndarlógin inniheldur eina røð av rættindum til skrásetta: rætt til innlit, rætt at móttaka upplýsingar við savnan av persónupplýsingum, rætt at átala og rætt at krevja upplýsingar rættaðar, strikaðar ella stongdar, rætt til dátuflutning og reglur um individuellar avgerðir, undir hesum profilering. Í hesi grein draga vit trý rættindi fram, nevniliga rætt til innlit, rætt til rætting og rætt til striking.

## Rættur til innlit

Sum útgangsstøði hevur tú rætt at síggja tær persónupplýsingar, ið verða viðgjørdar um teg. Á henda hátt verður gjøgnumskygni tryggjað. Eisini hevur tú rætt til at fáa *eitt* avrit av hesum upplýsingum útflýggjað frá dátuábyrgdaranum fyri einki. Afturat tí hevur tú rætt til innlit í, hvussu upplýsingarnar verða viðfarnar, undir hesum, hvat endamálið við viðgerðini er, hvaðani upplýsingarnar stava, og hvussu leingi tær verða goymdar. Endamálið er, at skrásetti kann tryggja sær, at viðgerðin er lóglig.

## Rættur til rætting

Tú hevur rætt til at fáa rættað skeivar upplýsingar um teg. Eisini hevur tú rætt til at fáa lagt afturat upplýsingum um teg, sum eru ófullfíggjaðar.

## Rætturin at verða strikaður ella rætturin at verða gloymdur

Rætturin at verða strikaður verður eisini nevndur rætturin at verða gloymdur. Sum útgangsstøði hevur tú rætt til at krevja, at upplýsingar verða strikaðar, um ein av treytunum fyri hesum er lokin. Hetta kann t.d. vera, at endamálið við at viðgera tínar upplýsingar er rokkið ella ikki longur er viðkomandi. Hetta kann eisini vera, um viðgerðin er grundað á eitt samtykki frá tær, sum tú hevur tikið aftur.

## Kæra

Skrásetti kann kæra til Dátueftirlitið, um viðkomandi ikki er nøgdur við, hvussu persónupplýsingar hjá viðkomandi verða viðgjørdar.

## Trygdartiltøk

Dátuábyrgdari skal altíð syrgja fyri at verja persónupplýsingar við hóskandi trygdartiltøkum innan fyriskipanarliga trygd (t.d. mannagongdir um atgongd til persónupplýsingar), tekniska trygd (t.d. mannagongdir um nýtslu av teldum, forritum og fartelefonum) og fysiska trygd (t.d. mannagongdir um trygdan av hølum og skipan av fjararbeiðsplássum).

## Útgangur

Tað er týdningarmikið fyri dátuábyrgdarar at seta seg inn í lógarreglurnar á økinum, so at teir kunnu lúka øll krøv í lógini. Samstundis er týdningarmikið hjá skrásetta at vita, hvørji rættindi og hvørja verju viðkomandi hevur í lógini, so at viðkomandi um neyðugt kann krevja sín rætt.

Dátuverndarrættur kann møguliga tykjast turrisligur, men hetta økið innan løgfrøði kemur væntandi at fylla meira komandi árini, og fyri áhugað kann verða víst til heimasíðurnar hjá føroyska Dátueftirlitinum og danska Datatilsynet. Eftirlitini framleiða vegleiðingar og hava ymiskt tilfar á teirra heimasíðum. Um áhugi er fyri at kava niður í dátuverndarrættin, kann ein lesa bøkurnar *Databeskyttelsesret* frá 2018 og *Personen i persondataretten* frá 2019. Peter Blume hevur skrivað báðar bøkurnar, hann er professor, dr.jur. á Løgfrøðiliga Fakultetinum við Keypmannahavnar Universitet.

---

[i] Peter Blume, *Databeskyttelsesret* (Jurist- og Økonomforbundets Forlag, 5. udgave, 2018), s. 1.

[ii] Charles Jennings og Lori Fena, *The hundredth window* (2000), s. 22.

[iii] Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónupplýsingum, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004.

[iv] EUROPA-PARLAMENTETS OG RÅDETS FORORDNING (EU) 2016/679 af 27. april 2016 om beskyttelse af fysiske personer i forbindelse med behandling af personoplysninger og om fri udveksling af sådanne oplysninger og om ophævelse af direktiv 95/46/EF (generel forordning om databeskyttelse).

[v] Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónupplýsingum, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004 (persónupplýsingarlógin), § 1.

[vi] Peter Blume, *Personen i persondataretten* (Djøf Forlag, 1. udgave, 2019): s. 133f.

[vii] Løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin).

[viii] Court of Justice of the European Union, PRESS RELEASE No 112/16, Luxembourg, 19 October 2016, Judgment in Case C-582/14, Patrick Breyer v Bundesrepublik Deutschland: https://curia.europa.eu/jcms/upload/docs/application/pdf/2016-10/cp160112en.pdf

[ix] Viðmerkingar til løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin): https://logting.fo/files/casestate/27577/051.19%20U.t.%20ll.%20um%20vernd%20av%20personupplysingum%20-%20Datuverndarlogin.pdf